Tórshavn, tann 15. juni 2007
J.Nr.: 200700007 / 18
(at tilskila í svari)

# Frágreiðing

frá

# Eftirlitsvitjanini í sambýlinum: Bóndaheygur 14 í Tórshavn

tann 27. februar 2007

TRAÐAGØTA 43 • POSTSMOGA 2008 • 165 ARGIR
TELEFON 35 85 00 • TELEFAX 35 85 01 • E-MAIL: LUM@LUM.FO

**Innihaldsyvirlit**

1. Inngangur....3
2. Sambýlið á Bóndaheygi 14 í Tórshavn....5
2.1. Starvsfólk....5
2.2. Búfólk....5
3. Frælsistøka og harðskapur ímóti starvsfólki....6
3.1. Búfólk við dómi....6
3.2. Læsing og ávaringarskipan....13
3.3. Valdsnýtsla/harðskapur ímóti starvsfólki....15
4. Dagliga virksemið hjá búfólkunum....18
5. Heilsuviðurskifti....21
5.1. Umsiting av heilivági....21
5.2. Rúsevni....23
5.3. Royking....24
6. Persónligar upplýsingar og samskifti....24
6.1. Varðveitsla av persónligum upplýsingum....24
6.2. Samskifti....27
7. Fíggjarviðurskifti....27
7.1. Generelt....27
7.2. Umsiting av pengum og ognum hjá búfólki....29
8. Eftirlit....32
9. Rundtúrur....33
9.1. Generelt....33
9.2. Loftið....33
Íbúð nr. 1....33
9.3. Miðhæddin....34
Íbúð nr. 2....34
Íbúð nr. 3....35
Baðirúm til íbúð 1, 2 og 3....36
Vaktarrúm....36
Starvsfólkabaðirúm....36
Felagsrúm....37
Starvsfólkarúm....37
Gongd í miðhædd....37
9.4. Kjallarin....38
Íbúð nr. 4....38
Íbúð nr. 5....38
Skrivstovan....39
Teldurúm....39
Gongd og trappur í kjallara....39
Fýrrúm....40
9.5. Húsið og økið uttandura....40
10. Summarhúsøkið á Ternuryggi....42
11. Samrøður við búfólk....43
12. Kunning og uppfylging....44
Viðlagt skjal....45

# 1. Inngangur

Sambært § 5 í umboðsmanslógini hevur umboðsmaðurin eftirlit við, at almenna umsitingin ikki ger mistøk ella vanrøkir sínar skyldur, og at umsitingin ikki fremur órætt ímóti einstaka borgaranum.

Sambært § 8, stk. 1 hava umsitingareindirnar skyldu til at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Harumframt hevur umboðsmaðurin sambært § 8, stk. 3 í lógini rætt til at vitja øll støð, ið verða kannað, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Sum ein liður í virksemi sínum, gjørdi umboðsmaðurin av at fara á eina eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi 14 í Havn. Orsøkin til, at hetta sambýlið varð valt var, at sambýlið hýsir einum veikum bólki í samfelagnum, sum hevur ringt við at koma til orðanna. Harumframt hevur sambýlið serligan áhuga, av tí at persónar, ið hava dóm, búgva í sambýlinum.

Umboðsmaðurin fer í hesi frágreiðing bert at viðgera leiklutin hjá teimum føroysku myndugleikum, sum varða av hesum øki. Sambært § 4, stk. 1 í umboðsmanslógini hevur umboðsmaðurin ikki heimild til at viðgera leiklutin hjá dómsvaldinum og Fútanum, sum eru danskir myndugleikar í Føroyum. Serforsorgin varð tann 1. januar 1988 yvirtikin sum føroyskt málsøkið, jb. ”lov nr. 719 af 18. november 1987 om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne”.

Eftirlitsvitjanin var í samráð við sambýlið og Nærverk sett til tann 27. februar 2007. Frammanundan eftirlitsvitjanini var ein fyrireikandi fundur hildin við leiðsluna í sambýlinum, leiðsluna í Nærverki og umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðið. Fundurin varð hildin tann 19. januar 2007.

Eftirlitsvitjanin byrjaði við einum fundi við leiðsluna, t.e. leiðarin og varaleiðarin, starvsfólkaumboð, leiðsluna í Nærverki og umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðið. Frá umboðsmanninum luttóku umboðsmaðurin og tvey starvsfólk.

Aftaná døgurða hevði umboðsmaðurin samrøðu við trý búfólk, sum høvdu biðið um fund. Síðani vísti leiðarin í sambýlinum umboðsmanninum runt í húsinum, og at enda varð fundur hildin við leiðaran í sambýlinum, leiðsluna í Nærverki og umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðið, har tikið var samanum dagin.

Á eftirlitsvitjanini greiddi leiðarin umboðsmanninum frá, at sambýlið leigar eitt økið á Ternuryggi, har búfólkini arbeiða og halda til um summarið. Av tí at hetta hevur týdning fyri trivnaðin

og lívsgóðskuna hjá búfólkunum, bað umboðsmaðurin um at síggja summarhúsøkið. Hendan vitjan varð framd tann 29. mars 2007. Á vitjanini luttóku leiðarin og varaleiðarin, eitt búfólk og ein praktikantur. Frá umboðsmanninum luttóku umboðsmaðurin og tvey starvsfólk.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin fingið neyðug skjøl og upplýsingar frá sambýlinum á Bóndaheygi 14, Nærverki og Almanna- og heilsumálaráðnum.

# 2. Sambýlið á Bóndaheygi 14 í Tórshavn

Bóndaheygur 14 er eitt sambýli, sum hýsir sálarveikum og menningar-tarnaðum búfólkum, ið kunnu verða til ampa bæði fyri seg sjálvan og onnur.

Stovnurin var upprunaliga settur á stovn, av tí at onki tilboð var til persónar, ið vóru dømdir til uppihald á stovni undir Andveikraverndini í Føroyum. Í 1990 fekk ein føroyingur ein slíkan dóm, og neyðugt var at geva honum eitt nøktandi tilboð. Í hesum sambandi var nýggjur stovnur stovnaður í Tórshavn.

Búfólkini fluttu síðst í 1999 inn í húsini á Bóndaheygi 14, Tórshavn, sum "Sjálvsognarstovnurin Sambýlir" hevði keypt til endamálið.

Stovnurin hoyrir bygnaðarliga til Nærverk (fyrr Heimarøktin- og Serforsorgin) og er skipaður undir eini deild í Nærverki, ið kallast Trivnaðartænastan (fyrr Serstovnadeildin). Deildin veitir stovnspláss til persónar við serligum tørvi. Sambýlið er ikki knýtt bygnaðarliga at psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, men búfólkini fáa javnan viðgerð á deplinum.

"Sjálvsognarstovnurin Sambýlir" eigur sjálv húsini á Bóndaheygi 14. Sjálvsognarstovnurin er stovnaður av landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum. Leiðslan fyri sjálvsognarstovnin er ein nevnd við 3 limum. Landsstýrismaðurin velur limir og varalimir og skipar nevndina, jb. Viðtøkur fyri Sjálvsognarstovnin Sambýlir, november 1999.

## 2.1. Starvsfólk

Í sambýlinum starvast 14 starvsfólk. 11 eru í føstum starvi, ímeðan 3 eru í avloysarastarvi. 2 av teimum føstu starvsfólkunum arbeiða í ¾ tíð, 1 arbeiðir 40%, ímeðan 8 arbeiða fulla tíð. 5 av starvsfólkunum eru námsfrøðingar, ímeðan 9 eru ófaklærd. Hesi hava tó drúgvar starvsroyndir. 1 vaskifólk starvast sum tímaløntá stovninum.

Tað eru altíð starvsfólk til arbeiðis á stovninum. Um dagin eru fleiri til arbeiðis, ímeðan bert ein náttarvakt er hvørja nátt. Tað er ikki nógv sjúka ímillum starvsfólkini á stovninum. Tá ið onkur er sjúkur, verður í stóran mun avloysari tilkallaður.

## 2.2. Búfólk

Á stovninum eru 5 búfólk; 4 menn og 1 kvinna. Tvey búfólk hava dóm. Eitt búfólk hevur havt dóm, men dómurin er avtikin. Eitt búfólk nýtir koyristól.

Búfólkini eru bæði sinnisveik og menningartarnað. Eingi av búfólkunum eru gjørd ómyndug, men tvey av búfólkunum hava verja, av tí at tey hava dóm.

Tveir kontaktpersónar eru knýttir at hvørjum búfólki á stovninum. Kontaktpersónarnir umboða búfólkini í øllum viðurskiftum. Eingin avvarðandi umboðar búfólk.

*Tað er óheppi, at búfólk við dómi og búfólk uttan dóm búgva á sama stovni. Hetta hevur t.d. við sær, at tey búfólk, ið ikki hava dóm, eru undir somu ávaringarskipan, sum tey búfólkini, ið hava dóm, og kunnu tí ikki ferðast frítt inn og út úr íbúð sínari, sí nærmari undir punkt 3.2. niðanfyri. Eisini hevur hetta við sær, at tey búfólk, ið ikki hava dóm, kenna seg settan í bás saman við teimum búfólkum, ið hava dóm. Av tí, at tað sær út til, at búfólkini trívast saman, fari eg ikki at gera meira við hetta, men* ***eg fari at biðja Nærverk*** *umhugsað samansetingina av búfólki hesum viðvíkjandi, tá ið tey taka nýggj búfólk inn á stovnin.*

Í hoyringsskrivi, dagfest 6. juni 2007, hevur Nærverk boðað mær frá, at Nærverkið fer at umhugsa samansetingina av búfólkum, um nýggj búfólk flyta inn á bústovnin á Bóndaheygi 14. Ein onnur loysn hevði verið at flutt tey, sum hava dóm fyri seg sjálvan.

*Atkomumøguleikarnir fyri búfólki, ið nýtir koyristól, eru vánaligir. Hetta komi eg aftur til seinni í hesi frágreiðing.*

# 3. Frælsistøka og harðskapur ímóti starvsfólki

## *3.1. Búfólk við dómi*

Í sambýlinum búgva tveir menn, ið hava dóm sambært § 16, stk 2., jb. § 68 í revsilógini.

*Viðvíkjandi dóminum frá 1990 (A)*
Tann 19. juli 1990 feldi Føroya Rættur dóm í revsimáli nr. 159/1989. Úrskurðurin var soljóðandi:

> ”Thi kendes for ret:
> Tiltalte … dømmes til anbringelse under Åndssvageforsorgen med mulighed for anbringelse i lukket institution, hvis hans adfærd gør det påkrævet.”

Stutt eftir, varð serligur stovnur stovnaður til tann dømda. Stovnurin er fluttur nakrar ferðir og liggur í dag á Bóndaheygi 14 í Havn, sí nærmari omanfyri undir punkt 2.

Dómurin varð tikin uppaftur tann 3. november 1993, har úrskurðurin var soljóðandi:

> ”Thi bestemmes:
> Den af domfældte … fremsatte begæring om ophævelse af den ved dommen af 19. juli 1989 *(mín viðmerking: 1990)* idømte foranstaltning tages ikke til følge.”

Síðani er dómurin ikki uppafturtikin. Nú eru umleið 17 ár síðani, dómur varð sagdur í málinum. Leiðslan í sambýlinum greiddi umboðsmanninum frá, at verjin og tey avvarðandi hjá tí dømda í løtuni arbeiða við at fáa dómin uppafturtiknan. Leiðslan veit ikki, hvønn leiklut hon hevur í mun til uppafturtøku av dóminum, og tí verður einki gjørt frá teirra síðu fyri at fáa dómin uppafturtiknan.

Tá ið tann dømdi flutti inn á stovnin, varð ein reglugerð tilevnað til hansara. Í reglugerðini varð ásett, at hann skuldi verða undir umsjón av starvsfólki 24 tímar um døgnið. Hann skuldi hava serlæknaviðgerð og harumframt sosialnámsfrøðiliga viðgerð á stovninum. Tann dømdi skuldi taka heilivág, tá ið hetta varð honum álagt. Hvørt ár skuldi støðumeting gerast og viðgerðarfundur skuldi verða hildin.

Í støðulýsingini, sum starvsfólk á stovninum hava gjørt í 1997, sæst at sosialnámsfrøðilig ætlan er sett í verk til tann dømda á stovninum. Nýggj støðulýsing og virkisætlan varð gjørd í 1999. Tað sæst ikki í málinum, at aðrar støðulýsingar eru gjørdar fyrr enn í februar 2007. Hendan støðulýsingin sigur ikki nakað um menningina hjá tí dømda. Tann dømdi tekur heilivág hvønn dag.

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at tað enn er álagt starvsfólkum at verða hjá tí dømda 24 tímar um døgnið. Um náttina er ávaringarskipan sett til í húsinum, og ein sovandi náttarvakt. Tann dømdi hevur tó fingið loyvið frá fútanum til at verða einsamallur úti 3 tímar um dagin. Leiðslan ivaðist í, hvørt Nærverk ella Fútin hevur ábyrgd av tí dømda hesar tímarnar.

Nærverk søkir Fútan um frítíðarloyvi til tann dømda. Vanliga verður søkt einaferð um árið til ávísar tíðir av árinum, t.d. verður søkt um, at tann dømdi kann fara í páskafrí, summarfrí, heystfrí, jólafrí, vikuskifti ella annað. Loyvið verður givið fyri eitt ár í senn. Ímeðan tann dømdi er í feriu, hevur Fútin ábyrgd av honum. Leiðarin hevur upplýst, at tað liggur fast, at familjan hjá tí dømda kemur til árligan fund í samband við, at avtalur um heimavitjan verða fastlagdar. Á hesum fundi verður eisini tosað um gongdina seinasta árið, og hvussu sinnisstøðan hjá tí dømda er.

Av umsóknunum frá Nærverk til Fútan framgongur, at tann dømdi mennir seg meira og meira, dugir væl at koma fram við teimum

trupulleikum, sum stinga seg upp, og hann tosar við starvsfólkini, tá okkurt er, sum hann er ótryggur um. Seinasta umsókn, ið liggur í málinum, er frá 29. mai 2006. Í hesi umsókn stendur, at bæði starvsfólk og avvarðandi eru samd um, at tann dømdi alt tað seinasta árið hevur havt tað sera gott.

Í løtuni hevur tann dømdi fingið loyvi frá fútanum til at vitja mammu sína ella beiggja sín uttan fylgi av starvsfólki, eitt vikuskifti um mánaðin, ein mánaða í summarfrítíð, 14 dagar í oktober, umleið 14 dagar á jólum og umleið 14 dagar á páskum. Harumframt hevur tann dømdi loyvi til at vitja mammu sína og beiggja sín uttan fylgi av starvsfólki í meira enn 3 tímar og koma aftur um kvøldið, upp til 12 ferðir í eitt ár, jb. skriv frá fútanum, dagfest 1. juni 2006.

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at tann dømdi ikki fær loyvi til at ferðast, annað enn til Danmarkar. Tí sleppur hann ikki við, tá ið hini búfólkini fara á skíferiu ella á aðra feriu uttanlands. Fara tey á feriu saman í Danmark, kunnu hini búfólkini fara við Norrønu, ímeðan tann dømdi má fara við flogfari. Hetta tyngir tann dømda nógv í gerandisdegnum.

Leiðarin segði eisini, at tað í heila tikið tyngir tann dømda nógv sálarliga, at dómurin hjá honum ikki verður uppafturtikin. Hann tosar dagliga um, at hann er dømdur, og um hvussu lív hansara verður, tá ið hann ikki longur er dømdur.

*Viðvíkjandi dóminum frá 1995 (B)*

Tann 20. september 1995 feldi Føroya Rættur dóm í revsimáli nr. 98/1995. Úrskurðurin var soljóðandi:

> ”Thi kendes for ret:
> Tiltalte … dømmes til tilsyn af Almannastovan vedrørende personer med vidtgående psykiske handicap, således at han skal efterkomme tilsynsmyndighedens bestemmelse om ophold og arbejde, og således, at der af tilsynsmyndigheden kan træffes bestemmelse om anbringelse i institution for peroner med vidtgående psykiske handicap samt lægelig behandling ...”

Dómurin er ongantíð tikin upp til endurskoðan. Nú eru umleið 12 ár síðani, at dómurin varð feldur.

Ein reglugerð varð tá gjørd fyri uppihaldið hjá tí dømda. Í reglugerðini verður ásett, at tann dømdi skal vera undir eftirliti innan- og uttandura allan dagin. Hann skal vera undir serlæknaligari viðgerð og harumframt fáa sosialnámsfrøðiliga viðgerð. Tryggjast skal, at hann hevur eitt gott samband við familju sína. Vitjanir skulu gerast saman við starvsfólki. Støðumetingar skulu gerast, og viðgerðarfundir skulu verða hildnir við jøvnum millumbilum.

Av støðulýsingini, sum starvsfólk á stovninum hava gjørt í 1997, sæst at sosialnámsfrøðilig viðgerð er sett í verk til tann dømda. Tað sæst ikki í málinum, at aðrar støðulýsingar eru gjørdar, fyrr enn fyrst í februar 2007. Av hesari lýsing sæst, at í mun til trupuleikan, ið tann dømdi var dømdur fyri, er støðan óbroytt, men hansara sjálvsálit og sjálvsvirði eru í støðugari menning. Tann dømdi tekur heilivág hvønn dag.

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at tað enn er álagt starvsfólkum at verða um tann dømda 16 tímar um døgnið. Tað er bert um náttina, at tann dømdi ikki hevur eitt starvsfólk afturat sær. Tá er ávaringarskipan sett til í húsinum, og ein sovandi náttarvakt. Leiðslan ivaðist í, hvørt Nærverk ella Fútin hevði ábyrgd av tí dømda í teimum tímum, hann ikki er undir eftirliti.

Tað sæst í skjølum í málinum, at leiðslan, søkir Serstovnadeildina (nú Trivnaðartænastuna) um frítíðarloyvi til tann dømda. Treytirnar fyri loyvi eru vanliga tær, at mamman hevur ábyrgdina av honum, ímeðan hann er hjá henni. Tað er hon sum má syrgja fyri, at tann dømdi ikki fær møguleika til at verða uttan umsjón. Á ferðini til mammuna skal tann dømdi hava fylgjara við, og mamman skal standa fyri honum á staðnum og fylgja honum avstað aftur. Søkt verður um frítíðarloyvi, tá ið tørvur er á tí, hetta verið seg páskaferia, summarferia, jólaferia o.a.

*Eg fari undir hesum punkti bert at viðgera leiklutin hjá føroysku myndugleikunum. Sambært § 4, stk. 1 í umboðsmanslógini hevur umboðsmaðurin ikki heimild til at viðgera leiklutin hjá dómsvaldinum og fútanum.*

*Omanfyrinevndu persónar, ið hava dóm ávíkavíst til uppihald á stovni, og til umsjón Almannastovunnar, eru dømdir sambært § 16, stk. 2, jb. § 68 í revsilógini, (lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939: straffeloven, som senest ændret ved anordning nr. 134 af 2. marts 2004).*

*Tá ið útferðarloyvi skulu gevast teimum dømdu, ganga myndugleikarnir eftir: "Justitsministeriets cirkulære af 15. november 1977 om meddelelse af friheder m.v. til personer, der i medfør af straffelovens § 68 eller § 69 er dømt til anbringelse i hospital for sindslidende (psykiatrisk sygehus eller sygehusafdeling) eller institution for åndsvage".*

*Hetta rundskriv varð sett úr gildi í Danmark við "bekendtgørelse nr. 680 af 10. juli 2000 om udgangstilladelse m.v. til personer, der er anbragt i hospital eller institution i henhold til strafferetlig afgørelse*

*i medfør af farlighedsdekret". Seinni er nýggj kunngerð nr. 200 frá 25. mars 2004 við sama heiti, sett í gildi í staðin fyri hesa kunngerð. Kunngerðirnar eru settar í gildi við heimild í § 41 a í "LBK nr. 1111 af 01/11/2006 om anvendelse af tvang i psykiatrien", § 765, stk. 5 og § 811, stk. 2 í donsku rættargangslógini, jb. "LBK. nr. 1001 af 05/10/2006 om bekendtgørelse af lov om rettens pleje" og § 73 a og § 74 a, stk. 4 í donsku revsilógini, jb. "LBK. Nr. 1000 af 05/10/2006 om bekendtgørelse af straffeloven".*

*Umframt hetta eru fleiri broytingar gjørdar í donsku revsilógini. M.a. eru nýggjar § 68 a og § 69 a settar inn í lógina. Við hesum lógarreglum skal ein dómur, har ein persónur er dømdur til uppihald á stovni sambært § 68 og § 69, takast upp aftur í seinasta lagi 5 ár eftir, at dómur er feldur. Í serligum førum kann rætturin, eftir umbøn frá ákæruvaldinum, leingja freistina við 2 árum. Hevur ein persónur fingið lagaligari dóm enn til uppihald á stovni sambært § 68 og § 69, sum t.d. at verða dømdur undir umsjón Almannastovunnar, skal dómurin verða uppafturtikin í seinasta lagi 3 ár eftir, at dómur er feldur. Í serligum førum kann rætturin, eftir umbøn frá ákæruvaldinum, leingja freistina, tó í mesta lagi til 5 ár.*

*Við hesum lógarásetingum er rættarstøðan hjá teimum, ið fáa dóm sambært § 68 og § 69 í donsku revsilógini betrað munandi.*

*Av tí at lógarverkið í Føroyum ikki er dagført, er rættarstøðan hjá dømdum menningartarnaðum í Føroyum sera vánalig. Myndugleikarnir halda seg bert til omanfyrinevnda rundskriv frá 1977.*

***Eg fari staðiliga at heita á landsstýrismannin í innlendismálum**, sum umsitur málsøkið revsi- og rættargangslóg, um at skipa so fyri, at lóggávan á hesum økinum verður dagførd, soleiðis at rættarstøðan hjá teimum dømdu á Bóndaheygi 14 verður tryggjað.*

Við skrivi, dagfest 11. mai 2007, hevur Innlendismálaráðið boðað umboðsmanninum frá, at avtala er gjørd við danska løgmálaráðið um at dagføra revsilógina, og er ætlanin at leggja uppskot hesum viðvíkjandi fyri Løgtingið í heyst. Í tann mun, at broytingar skulu gerast í rættargangslógini orsakað av broytingunum í revsilógini, verður hetta gjørt.

*Eg havi tikið hesar viðmerkingar til eftirtektar, og fari at biðja landsstýrismannin um at lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

***Eisini fari eg at heita á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum**, um at tilevna tíðarhóskandi reglur um útferðarloyvi til persónar, ið hava dóm til uppihald á stovni.*

Í hoyringssvari sínum, dagfest 31. mai 2007, hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at arbeitt verður við at tillaga donsku lógina um ”anvendelse af tvang i psykiatrien” til føroysk viðurskifti, og síðani fáa lógina setta í gildi í Føroyum. Landsstýrismaðurin metir ikki, at hann skal áseta reglur um útferðarloyvi.

*Eg havi tikið hesar viðmerkingar til eftirtektar. Tað er løgmaður, ið býtir málsøkini ímillum landsstýrismennirnar, jb. § 33 í stýrisskipanarlógini, og verður tað tí upp til løgmann at avgera, hvør landsstýrismaður skal tilevnað kunngerð um útferðarloyvi. Hetta fari eg tí ikki at taka støðu til, annað enn at staðfesta, at tørvur er á at áseta nýggjar reglur um útferðarloyvi.*

*Sambært § 2, stk. 2 í rundskrivinum skal ein yvirlækni m.a. taka avgerð um, í hvønn mun tann dømdi kann verða uttan starvsfólk á stovninum, og hvørt tann dømdi kann fáa loyvi til at vera uttanfyri stovnin í upp til 3 tímar um døgnið uttan starvsfólk. Tá ið talan er um, at tann dømdi skal út um stovnin í longri tíð enn 3 tímar, og tá ið tann dømdi í einstøkum førum skal gista hjá familju, skal ein yvirlækni saman við statsadvokatinum taka avgerð um útferðarloyvi, jb. § 2, stk. 3 í rundskrivinum. Danska Justitsministeriet tekur m.a. avgerð um, hvørt tann dømdi kann fáa loyvi til at arbeiða uttanfyri stovnin, og gista hjá familju v.m. longri enn bert í einstøkum førum, jb. § 2, stk. 4 í rundskrivinum.*

*Tá ið loyvi verður givið til tann dømda A, sambært § 2, stk. 2 í rundskrivinum og tá ið tilmæli sambært § 2, stk. 3 verður sent fútanum, virkar leiðarin fyri Serforsorgini, (nú deildarleiðarin fyri Trivnaðar-tænastuni), sum ”overlægen”. Nærverk hevur greitt umboðsmanninum frá, at hetta kemst av tí, at eingin yvirlækni er settur í starv á stovninum.*

*Hetta meti eg ikki verða nøktandi. Orsøkin til, at ein yvirlækni skal inn í myndina, má verða tann, at ein yvirlækni kann gera eina læknaliga meting ella sjúkugreining av persóninum, um hvussu vandamikil persónurin er, og um persónurin er í menning í mun til tann tilburð, hann hevur fingið dóm fyri. Ein slík meting eigur at liggja til grund fyri teimum útferðarloyvum, ið verða givin persóninum.*

*Av tí at eingin yvirlækni starvast í Nærverki, er tað kanska ikki møguligt, at ein yvirlækni tekur avgerð um útferðarloyvi. Tó eigur Nærverk at fáa eina læknaliga meting ella sjúkugreining til vega frá yvirlækna á psykiatriska deplinum, sum kann liggja til grund, tá ið loyvi verður givið.*

***Eg fari at heita á Nærverk** um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

Í hoyringsskrivi, dagfest 6. juni 2007, hevur Nærverk boðað mær frá, at Nærverkið fer at taka upp samstarv við Psykiatriska depilin, soleiðis at tað verður ein yvirlækni, sum ger metingina, sum skal liggja til grund, tá ið loyvi skulu gevast í sambandi við útferðarloyvi.

*Eg fari at biðja Nærverk lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

*Tá ið loyvi verður givið til tann dømda B, tekur leiðarin á Serforsorgini, (nú deildarleiðarin á Trivnaðartænastuni), avgerð um útferðarloyvi. Tann dømdi B er sambært § 16, stk. 2, jb. § 68 í revsilógini dømdur undir umsjón Almannastovunar. "Justitsministeriets cirkulære af 15. november 1977" er bert galdandi fyri persónar, ið eru dømdir til uppihald á andveikrastovni ella sinnissjúkrahúsi, jb. § 1 í rundskrivinum. Rundskrivið er tí ikki galdandi fyri dómin hjá tí dømda B.*

*Síðani dómurin varð feldur í 1995, er umsitingin av bútilboðum til menningartarnað flutt frá Almannastovuni til Nærverk. Við hesum er umsitingin av útferðarloyvum til tann dømda B, flutt við. Eg havi onga viðmerking hesum viðvíkjandi.*

*Tá ið teir dømdu eru í feriu ella annað við útferðarloyvi frá fútanum, meti eg, at tað er fútin, og ikki sambýlið, ið hevur ábyrgdina av teimum.*

*Tann dømdi A fekk dóm til uppihald á stovni undir Andveikraverndini í 1990. Dómurin varð tikin uppaftur í 1993, men var óbroyttur. Tann dømdi B varð dømdur undir umsjón Almannastovunnar í 1995. Dómurin er ongantíð tikin uppaftur.*

*Tað er als ikki nøktandi, at ein dómur um uppihald á stovni í óvissa tíð ikki verður tikin uppaftur til nýggja støðutakan ávíkavíst í 14 og 12 ár, og at læknaligar metingar ikki verða gjørdar við jøvnum millumbilum, sum kunnu staðfesta, hvørt persónarnir framhaldandi er vandamiklir.*

*Nærverk og leiðslan á Bóndaheygi 14 ivast í teirra uppgávu viðvíkjandi uppafturtøku av dómunum og meta ikki, at tað er teirra ábyrgd at mæla til, at dómurin verður uppafturtikin.*

*Tað er torført at staðfesta, hvør hevur ábyrgdina viðvíkjandi uppafturtøku av dómunum, men eftir mínari meting, átti sambýlið, ið veit hvussu persónurin er fyri mentalt, at tikið stig til, at dómurin*

*verður uppafturtikin við jøvnum millumbilum. Tað er einki sum forðar fyri, at mannagongdin verður broytt hesum viðvíkjandi.*

*Tað sæst í málinum, at ein støðulýsing var gjørd av teimum dømdu í 1997, har skrivað varð, at ein nýggj støðulýsing og viðgerðarfundur skuldu verða á hvørjum ári. Eftir upplýsing frá leiðaranum í sambýlinum var nýggj støðulýsing og virkisætlan sett í verk fyri tí dømda A í 1999. Síðani sæst ikki í málinum, at ein støðulýsing er gjørd aftur fyrr enn í 2007. Tað er als ikki nøktandi, at støðan hjá teimum dømdu ikki verður tikin upp til eftirmeting við jøvnum millumbilum. Tá ið slík eftirmeting verður gjørd, eigur ein meting at fyriliggja frá yvirlækna á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum um, hvussu vandamikil persónurin er í løtuni, og hvussu menningin hjá honum er í mun til tað, hann hevur fingið dóm fyri.*

***Eg fari at heita á Nærverk**, um at fáa hesi viðurskifti í rættlag. **Eisini fari eg at heita á Nærverk** um at broyta mannagongd viðvíkjandi uppafturtøku av dómunum.*

*Tað kann væl vera, at tilmælið ljóðar uppá, at teir dømdu enn eru vandamiklir, og at tað tí verður mælt til, at dómurin ikki verður avtikin, men tað týdningarmikla er, at tann dømdi fær eina rættvísa rættargongd. Hetta er grundleggjandi fyri rættartrygdina hjá teimum dømdu.*

Í hoyringsskrivi, dagfest 6. juni 2007, hevur Nærverk boðað mær frá, at Nærverkið fer at fáa sær løgfrøðiliga hjálp til at broyta mannagongd í samband við uppafturtøku av dómunum.

*Eg fari at biðja Nærverk lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

## 3.2. Læsing og ávaringarskipan

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at stovnurin ikki er góðkendur sum ein afturlatin stovnur sambært § 5 í kunngerð nr. 1 frá 3. januar 2005 um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum.

Tað vil siga, at stovnurin er ein opin stovnur.

Tó verður stovnurin læstur um náttina, umleið frá kl. 23.00 til kl. 7.00 um morgunin. Øll búfólkini hava ein B-lykil, og kunnu læsa úthúrð og egnu íbúð upp við hesum lykli. Tað kemur tó næstan ikki fyri, at búfólkini ynskja at fara út um náttina.

Av tí at tveir við dómi búgva á stovninum, er ávaringarskipan sett á øll vindeygu og allar hurðar, bæði innan- og uttandura. Ávaringarskipanin verður eisini sett í gongd hvørt kvøld kl. 23.00. Hetta er tó ikki knívskorið. Er tað so, at onkur hyggur í sjónvarp ella annað eftir hetta, verður vanliga bíða við at seta skipanina til. Ávaringarskipanin verður sløkt aftur umleið kl. 7.00 um morgunin.

Tá ið búfólk er úti á vitjan hjá familju ella vinum, ynskja tey oftast sjálvi at koma heim innan kl. 23.00. Tó eru dømi um, at búfólk ynskja at verða úti eftir kl. 23.00. Í hesum førum verður loyvi sum oftast givið til tess.

*Talan er um eina frælsistøku, tá ið búfólkini verða læst inni á stovninum um náttina, og ávaringarskipan verður sett til. Sambært § 71, stk. 2 í grundlógini kann frælsistøka bert verða framd við heimild í lóg.*

*§ 16, stk. 2 í forsorgarlógini er soljóðandi:*

> *"stk. 2. Landsstyret fastsætter regler for institutionernes ledelse og drift samt regler om betingelserne for anvendelse af sikrede og lukkede afdelinger, isolation, fiksering m.v., der alene må ske, når forholdene i det enkelte tilfælde gør det absolut påkrævet. Landsstyret kan indhente udtalelse fra Socialministeriet."*

*Kunngerð nr. 1 frá 3. januar 2005 um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum, er sett í gildi við heimild í hesi grein.*

*Eg meti ikki, at tað er nøktandi, at reglur um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi brekum eru ásettar í kunngerð.*

***Eg fari at heita á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum** at taka hesi viðurskifti til umhugsunar, og lata meg frætta aftur.*

*Ongar reglur eru ásettar um, í hvønn mun ávaringarskipanir kunnu nýtast á stovnum undir Nærverki. Trý av búfólkunum í sambýlinum hava ikki dóm, men eru undir somu ávaringarskipan sum tey búfólkini, ið hava dóm. Hetta meti eg ikki vera nøktandi.*

***Eg fari somuleiðis at heita á lansstýrismannin í almanna- og heilsumálum** um at taka hesi viðurskifti til umhugsunar, og lata meg frætta aftur.*

Landsstýrismaðurin ásannar í hoyringsskrivi sínum, dagfest 31. mai 2007, at ásetingar um ávaringarskipan ikki eru fevndar av orðingini í § 16, stk. 2 í forsorgarlógini, og heldur ikki í kunngerð nr. 1 frá 3. januar 2005 um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum. Landsstýrismaðurin metir, at

møguligt er at fáa neyvari ásetingar um valdsnýtslu í § 16, harundir um ávaringarskipanir.

*Eg fari at biðja landsstýrismannin lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

## 3.3. Valdsnýtsla/harðskapur ímóti starvsfólki

Leiðslan í sambýlinum greiddi umboðsmanninum frá, at starvsfólkini í sambýlinum ofta koma út fyri, at harðskapstilburðir eru í húsinum, men tað er sera sjálvdan neyðugt at halda búfólki. Ósemjur vera sum oftast loystar við samtalu. Hóast búfólk taka í starvsfólk, verður ikki annað enn verja fyri egnan kropp nýtt. Um serliga ógvusligur harðskapur er, verja starvsfólk seg við at byrgja seg sjálvan inni til hjálp kemur á staðið. Harðskapurin á stovninum gongur mest út yvir konufólkini. Umframt harðskap eru starvsfólkini ofta úti fyri hóttanum um ymiskt frá búfólkum; til dømis hóttanir um sjálvmorð. Hetta er tyngjandi fyri starvsfólkini.

Leiðarin nevndi í hesum sambandi nøkur dømir um, at búfólk høvdu verið harðlig og hóttandi yvirfyri starvsfólki, uttan at hetta varð noterað ella fráboðað til Nærverk. Leiðslan helt, at starvsfólkini góðtóku ov nógvan harðskap. Helst av tí at tey kendu búfólkini so væl, eru góð við tey og ikki vilja skaða tey við at fráboða.

Greitt varð frá, at eingin møguleiki er fyri at fiksera fólk á stovninum. Tað kemur ikki fyri, at starvsfólk byrgja búfólk inni. Um búfólkini verða ov ógvuslig og harðlig, verða búfólkini, um tørvur er á tí, koyrd á psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum. Ein trupulleiki hevur tó verið, at psykiatriski depilin ikki vil taka búfólkini inn; kennir ikki ábyrgd av teimum, men metir, at stovnar og sambýlir mugu klára hesar trupulleikar sjálvi.

Umboðsmaðurin sendi, tann 30. mars 2007, fyrispurning til Landssjúkrahúsið hesum viðvíkjandi. Landssjúkrahúsið, psykiatriski depilin, sendi, tann 3. mai 2007, skriv til umboðsmannin, har upplýst varð, at innleggingar á psykiatriska deplinum eru læknavisiteraðar, antin av egnum kommunulækna ella av vakthavandi kommunulækna, ella í ávísum førum av lækna á psykiatriska deplinum í samband við ambulanta viðgerð. Búfólkini á Bóndaheygi 14 eru ikki øðrvísi stillaði enn onnur, og um læknaliga verður mett, at tørvur er á innlegging, kunnu øll verða ávíst til innlegging. Um talan er um akuttar innleggingar verður hetta avtalað millum kommunulækna og vakthavandi lækna á psykiatriska deplinum, og í slíkum førum kann verða nakað av bíðitíð til innlegging.

Stovnurin hevur oyðibløð um "fráboðan um valdsnýtslu v.m.", ið skulu fyllast út, tá ið valdsnýtsla yvirfyri búfólki verður framd. Hesi oyðibløð verða tó ikki nýtt. Heldur ikki verður fráboðað til Nærverk um valdsnýtslu ella harðskap. Tó verða flestu tilburðir við harðskapi frá búfólki og valdsnýtslu yvirfyri búfólki noteraðir í eina dagbók, ið liggur á skrivstovuni á stovninum. Einki oyðiblað er viðvíkjandi harðskapi yvirfyri starvsfólki á stovninum.

Leiðarin greiddi frá, at sambýlið ikki hevur nakra tilbúgvingarætlan viðvíkjandi harðskapi ímóti starvsfólki. Starvsfólkini plaga tó at ringja til varaleiðaran, tá ið tilburðir eru, sum starvsfólk ikki klára einsamøll. Sum nú er, hevur bert leiðarin fartelefon til arbeiðsbrúk. Sambýlið hevur søkt Nærverk um at keypa eina fartelefon til varaleiðaran, soleiðis at starvsfólkini altíð kunnu fáa fatur á bæði leiðara og varaleiðara. Hetta er ikki játtað teimum.

Sambýlið hevur eina avtalu við Vaktargarðin um, at tá ið ávaringarskipan fer í gongd á Bóndaheygi 14, skal Vaktargarðurin ringja og kunna seg um, hvørt tamarhald er á støðuni. Um eingin svarar, skal Vaktargarðurin koma á staðið.

Leiðarin greiddi frá einum tilburði, tá ið toruslátttur var. Tá fór ávaringarskipan í gongd. Telefonin virkaði ikki, so starvsfólk fekk ikki ringt til Vaktargarðin, og eingin kom á staðið. Vaktargarðurin sigur, at tá ið telefonsambandið er kvett, er einki samband við Vaktargarðin heldur. Tey fáa sostatt onga fráboðan um, at ávaringarskipanin fer í gongd. Leiðarin helt, at tað í hesum føri hevði verið gott, um tey høvdu havt eina fartelefon til náttarvaktina, sum kundi nýtast til neyðkall, tá ið fastnettelefonin er óvirkin.

*Likamlig valdsnýtsla er ein álvarsom atgerð, sum er vard av § 71 í grundlógini og art. 3 í Europeiska Mannarættindasáttmálanum. Tí er tað neyðugt at skjalfesta slíkar atgerðir, soleiðis at tað verður staðfest, hvat hendi í tí einstaka førinum; at valdsnýtslan stóð í mát við umstøðurnar, og at talan var um eina neyðstøðu. Hetta eisini soleiðis, at starvsfólkini eftirfylgjandi kunnu verja seg ímóti atfinningum og møguligum kærumálum. Av somu orsøk, eigur likamlig valdsnýtsla eisini at verða fráboðað Nærverki í hvørjum einstøkum føri.*

*Eftir góðum fyrisitingarsiði eigur harðskapur og hóttanir frá búfólki at verða noterað. Hetta eisini soleiðis at starvsfólkini eftirfylgjandi kunnu vísa til skjalfestu tilburðirnar, t.d. tá ið nýggj viðgerð skal setast í verk yvirfyri einum búfólki, heilivágur skal broytast, ella støða skal takast til, hvørt eitt ávíst búfólk kann verða verandi í sambýlinum vegna harðskap ella hóttanir. Notatini kunnu í hesum førum nýtast sum skjalfesting yvirfyri myndugleikum ella avvarðandi.*

*Leiðslan í sambýlinum hevur ført fram, at tað ikki altíð er møguligt, at innleggja búfólk bráfeingis á psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, tá ið tey gerast ov harðlig. Umboðsmaðurin hevur fingið frágreiðing hesum viðvíkjandi frá psykiatriska deplinum, og hevur tikið hesa frágreiðing til eftirtektar.*

*Er harðskapurin ella tilburðurin revsiverdur sambært kap. 25 í revsilógini, eigur at verða meldað til løgregluna. Í førum, har harðskapurin uppstendur bráfeingis, eigur løgreglan at verða boðsend.*

*Viðvíkjandi avtaluni, ið sambýlið hevur gjørt við Vaktargarðin, um at Vaktargarðurin skal koma á staðið, tá ið trupulleikar eru, skal eg vísa á, at Vaktargarðurin onga heimild hevur á hesum øki. Løgreglan hevur heimild til at steðga harðskapi, og tí eigur løgreglan at verða boðsend í slíkum førum.*

***Eg fari at heita á leiðsluna í sambýlinum** um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

*Sum høvuðsregla er ikki neyðugt at fráboða tilburðir viðvíkjandi harðskapi ímóti starvsfólki til Nærverk, men er talan um, at vandi er fyri starvsfólkum, og at búfólkið er ov vandamikið til at verða verandi í sambýlinum, eigur at verða fráboðað.*

***Eg fari tí at heita á Nærverk og leiðsluna í sambýlinum**, um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

Nærverk hevur í hoyringsskrivi, dagfest 6. juni 2007, boðað frá, at Nærverkið fer at arbeiða fram ímóti, at hvør einstakur stovnur í Trivnaðartænastuni hevur eina tilbúgvingarætlan í samband við harðskap ímóti starvsfólki.

Leiðarin hevur í hoyringsskrivi, dagfest 30. mai 2007, boðað frá, at viðvíkjandi valdsnýtslu hevur stovnurin skjøl at fylla út. Hesi fara starvsfólkini framvegis at brúka og senda Nærverkinum. Starvsfólkini fara framyvir at skipa notat um harðskap og hóttanir móti starvsfólki, soleiðis at hetta verður skjalfest. Starvsfólkini eru kunnaði um, at tað er løgreglan tey skulu ringja til, um harðskapur uppstendur knappliga, ella er ógvusligur. Tað verður tó ringt til leiðslu og varðaleiðara fyrst. Mannagongdirnar eru sostatt broyttar og starvsfólk eru kunnaði.

Leiðarin hevur boðað frá, at hon hevur vent sær til Tilbúgvingarstovuna, við umbøn um hjálp til at gera eina tilbúgvingarætlan fyri sambýlið. Leiðarin hevur ikki frætt aftur frá Tilbúgvingarstovuni hesum viðvíkjandi, men arbeitt verður við málinum.

*Eg fari at biðja Nærverk og leiðsluna í sambýlinum lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

*Viðvíkjandi fartelefonsambandi í sambýlinum er at siga, at tað eftir mínari meting er neyðugt fyri trygdina í sambýlinum, at bæði leiðari og varaleiðari hava fartelefon, soleiðis at starvsfólk kunnu fáa fatur á bæði leiðara og varaleiðara, tá ið ástendur. Hetta serliga sæð í mun til, at tveir persónar við dómi búgva í sambýlinum, og búfólkini í sambýlinum kunnu verða harðlig ímóti starvsfólkunum. Eisini vildi eg hildið, at neyðugt var at hava fartelefon til náttarvaktina um so er, at eingin streymur er til fastnetið. Hetta serliga sæð í mun til, at ein ávaringarskipan er tilknýtt húsunum.*

***Eg fari at mæla Nærverki** til at taka støðu til hetta og lata meg frætta aftur. Eisini fari eg at mæla Nærverki til at umhugsa eina betri trygdarskipan fyri starvsfólkini.*

Nærverk hevur í hoyringsskrivi, dagfest 21. mai 2007, greitt mær frá, at av tí at umstøðurnar á Bóndaheygi 14 vóru serligar, fingu tey bjóðað at læna eina fartelefon frá Meginskrivstovuni. Ætlanin var at taka málið uppaftur aftaná tríggjar mánaðir, hetta fyri at kanna, um arbeiðsumstøðurnar framvegis vóru spentar.

Vanlig mannagongd á stovnunum undir Trivnaðartænastuni er, at hvør stovnur hevur eina fartelefon. Hava stovnarnir fyri neyðini at hava fleiri fartelefonir, hevur tað verið vanligt, at tey hava keypt fartelefon við talitíðarkorti.

*Eg fari at biðja Nærverk um at lata meg frætta, hvat víðari hendir hesum viðvíkjandi.*

## 4. Dagliga virksemið hjá búfólkunum

Tað sæst av skjølunum í málinum, at reglugerð og støðulýsing varð gjørd til fýra búfólk í sambýlinum í 1997 og ein støðulýsing til eitt búfólk í 1999. Tað sæst ikki í málinum, at aðrar støðulýsingar eru gjørdar fyrr enn í februar 2007.

Í reglugerðunum varð m.a. ásett, at búfólkini skuldu fáa tilboð um sosial námsfrøðiliga viðgerð og serlæknaviðgerð, at búfólkini skuldu taka heilivág, fáa samtaluterapi frá sálarfrøðingi og røra seg likamliga. Í fleiri reglugerðum varð ásett, at støðumetingin um búfólkini skuldi eftirmetast á hvørjum ári, har møguligar viðgerðarbroytingar skuldu gerast. Eisini skuldi ein viðgerðarfundur verða á hvørjum ári við avvarðandi, umboð fyri Almannastovuna, arbeiðsplássið og sambýlið. Frágreiðing av hesum fundum skuldi sendast til avvarðandi, Almannastovuna og arbeiðsplássið.

Leiðarin í sambýlinum hevur í hoyringssvari sínum viðmerkt, at hetta er tað gamla slagi av viðgerðarfundum. Í dag er ikki aktuelt at hava Almannastovuna og arbeiðsplássið við á fundunum. Leiðarin helt, at tað hevði verið nøktandi, um viðgerðarfundir framyvir vórðu hildnir við umboðum frá Trivnaðartænastuni, sambýlinum og avvarðandi.

Reglugerðir fyri starvsfólk liggur eisini í støðulýsingunum fyri hvørt einstakt búfólk frá 1997. Í hesum reglugerðum verður m.a. ásett, at starvsfólkini skulu skapa tryggar karmar um búfólkini. Starvsfólkini skulu skriva og grundgeva, um punkt á vikuætlanini ikki verða hildin. Eisini skal skrivast í dagbókina eftir hvørja vakt, hvussu dagurin hevur gingið.

Av støðulýsingunum sæst at sosialnámsfrøðilig viðgerð er sett í verk fyri øll búfólkini. Støðulýsingarnar eru ymiskar, men sum heild kann sigast, at arbeitt varð við at skapa tryggar karmar og fáa eitt gott samskifti við búfólkini. Eisini varð arbeitt við at menna sjálvsálitið hjá búfólkunum, og menna tey bæði likamliga, sálarliga og sosialt, dentur varð lagdur á bæði persónligt reinføri og vøddamýking og reinføri í íbúðini. Dentur verður eisini lagdur á at fáa búfólkini at skilja ímillum kærleika og kynslív. Búfólkini taka heilivág hvønn dag.

Á eftirlitsvitjanini greiddi leiðarin á stovninum umboðsmanninum frá virkseminum hjá búfólkunum í dag. 3 búfólk hava partvíst arbeiði. Tvey búfólk arbeiða tveir dagar um vikuna á Verkstaðnum Vón. Eitt búfólk arbeiðir 2 tímar um vikuna, tá ið arbeiði er. Annars rippir hann húkar. Eitt búfólk arbeiðir ikki í løtuni, men eigur pláss á Verkstaðnum Vón. Annars rippir hann húkar, tá ið tað letur seg gera. Eitt búfólk arbeiðir ikki úti, men hevur til uppgávu, saman við starvsfólki, at keypa allan matin inn til húsið.

Leiðslan greiddi frá, at tá ið veðrið er til tað, verður farið niðan á summarhúsøkið á Ternuryggi saman við búfólkunum. Her arbeiða búfólkini við at umvæla og umbyggja summarhúsið og økið uttanum. Um summarið er hetta eitt gott arbeiðsstað. Búfólkini arbeiða lítið á Verkstaðnum Vón, og teimum tørvar tí eitt stað, har tey kunnu brúka sína styrki og kenna seg til nyttu. Búfólkini hava fingið somu tímaløn, sum tey fáa fyri arbeiði á Verkstaðnum Vón. Frá mitt í apríl arbeiða øll, uttan eitt búfólk, á summarhúsøkinum á Ternuryggi. Tvey búfólk hava søkt um farloyvi frá Verkstaðnum Vón til 1. oktober 2007, og eitt búfólk hevur søkt um farloyvi í árið út. Sambýlið hevur ikki fingið svar uppá umsóknirnar.

Mikudagur er heimadagur. Tá rudda og vaska búfólkini sínar íbúðir, eta við kontaktfólki sínum í býnum ella heima, gjalda rokningar v.m. Flestu búfólkini ganga til ítrótt fyri brekað, ið er skipað undir

kvøldskúlanum. Hetta kann verða fimleikur, styrkivenjing, svimjing v.m. Eisini ganga búfólkini túrar og renna. Tvey búfólk eru aktiv í ítrótti, og eitt búfólk gongur fast í Frítíðarklubbanum hjá Javna. Eitt búfólk spælir í tónleikabólki og nýtir nógva tíð til at venja. Annars hevur hetta búfólkið ikki onnur frítíðarítriv, men kundi hugsa sær at gingið á Eldratilhaldinum á Hoydalsvegi 40. Har er tó ikki pláss í løtuni.

Greitt varð eisini frá, at starvsfólkini í sambýlinum fara við jøvnum millumbilum at ferðast við búfólkunum. Farið verður ikki at ferðast hvørt ár, tað valdast hvussu nógvur peningur er til taks.

Maturin verður gjørdur á stovninum. Eitt búfólk er við til matinnkeypið saman við starvsfólki. Dentur verður lagdur á, at búfólkini fáa sunnan og fjølbroyttan mat. Øll búfólkini, uttan eitt, luttaka í matgerðini. Búfólkini eta í hvør sínari íbúð. Sambært starvsfólkunum, vilja búfólkini helst eta fyri seg sjálvan. Tað verður ofta ov nógv rok og klandur, um tey eta saman. Tó eta búfólkini onkuntíð saman í tí eina køkinum í miðhæddini, ið hoyrir til íbúðina hjá einum búfólki. Eitt av búfólkunum hevur ikki møguleika fyri at eta saman við hinum, av tí at viðkomandi situr í koyristóli, og eingin lyfta er upp á miðhæddina.

Leiðarin greiddi frá, at flestu búfólkini hava familju, ið tey vitja uttan hjáveru frá starvsfólki. Nøkur av búfólkunum hava felaga, sum tey hava nógv samband við. Tá ið avvarðandi koma at vitja búfólk á stovninum, hava tey møguleika at vera saman privat í íbúðunum uttan hjáveru frá starvsfólki. Summi avvarðandi gista hjá búfólkum á stovninum.

*Eg havi ikki førleika til at meta um námsfrøðiliga tilboðið í sambýlinum, men sum sæst av omanfyrinevndu reglugerðum og støðulýsingum, er ein ávís ætlan gjørd í 1997. Virksemið er skipað í vikuætlanir, vikuligar samtalur við búfólkið, árligar støðulýsingar og viðgerðarfundir við avvarðandi v.fl. Tó sæst ikki, at námsfrøðiliga arbeiðið á stovninum er dagført. Í málunum liggja ongar nýggjar støðulýsingar ella notat frá viðgerðarfundum. Hetta er ikki nøktandi. Fyri at búfólkini kunnu verða í støðugari menning, eigur námsfrøðiliga tilboðið á stovninum javnan at verða dagført.*

***Eg fari at heita á leiðsluna í sambýlinum** um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

Leiðarin hevur í hoyringsskrivi, dagfest 30. mai 2007, boðað frá, at leiðslan arbeiðir í løtuni við at gera virkisætlanir fyri hvørt búfólk sær. Tey hava haft ein temadag fyri starvsfólki, og øll eru farin í gongd við saman við búfólkunum at seta mál fyri hvat arbeiðast skal móti í nærmastu framtíð. Leiðarin greiður í hoyringsskrivinum nærmari frá, hvat ætlanin inniber.

*Eg havi tikið hesar viðmerkingar til eftirtektar.*

*Sambært tí, sum leiðarin hevur greitt mær frá og teirri fatan, ið eg fekk frá teimum búfólkum, ið eg hevði samrøðu við, sær tað annars út til, at búfólkini hava eitt gott innihald í gerandisdegnum. Tey arbeiða eftir førimuni. Tey umvæla og byggja eitt summarhúsøki, sum tey kunnu nýta. Tey ganga til frítíðarítriv, sum mennir tey likamliga og sálarliga. Alt hetta gevur búfólkunum lívsvirði.*

*Starvsfólkini fara javnan at ferðast við búfólkunum. Tað er eyðsæð, at hetta økir um lívsgóðskuna hjá búfólkunum. Hetta mennir tey bæði likamliga og sálarliga. Harumframt hevur tað týdning, at tey hava okkurt at síggja fram til.*

*Eisini sær út til, at stovnurin arbeiðir fyri, at búfólkini skulu hava samband við familju og vinir. Búfólkini kunnu vitja og fáa vitjan av familju og vinum uttan hjáveru frá starvsfólki. Hetta er í tráð við § 71 í grundlógini og art. 8 í Europeiska Mannarættindasáttmálanum.*

# 5. Heilsuviðurskifti

## *5.1. Umsiting av heilivági*

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at øll búfólkini fáa heilivág. Fýra búfólk fáa heilivágin í dosispakkum fyri eitt ávíst tíðarskeið í senn, ímeðan eitt búfólk fær heilivágin útskrivaðan uttan dosispakkar.

Leiðarin greiddi frá, at heilivágsgoymslan, sum er í vaktarrúminum, skal verða stongd. Eisini hevur hon givið boð um, at hurðin til vaktarrúmið altíð skal vera stongd, sí nærmari um heilivágsgoymsluna undir "vaktarrúm" niðanfyri.

Starvsfólkini fylgja "Mannagongd í samband við at geva heilivág", sum Nærverk hevur tilevnað. Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av hesi mannagongd.

Kommunulækni ella lækni á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum útskrivar heilivág. Tað kemur fyri, at bæði kommunulækni og psykiatriski depilin samstundis hava útskrivað heilivág til sama búfólk. Hetta er ein trupulleiki. Í slíkum førum ger pharmaceuturin á Apotekinum vanliga vart við, at ov nógvur heilivágur er útskrivaður. Pharmaceuturin fylgir tó bert við dosispakkunum, og tí ikki við tí eina búfólkinum, ið ikki fær dosispakkar.

Nærverk hevur í hoyringsskrivi, dagfest 21. mai 2007, boðað mær frá, at Nærverkið á fundi við m.a. leiðandi yvirlæknan á Psykiatriska deplinum um menningartarnaði við psykiatriskum trupulleikum, greitt hevur fingið avklárað mannagongdina soleiðis, at tá tað snýr seg um psykofarmaka, skal búfólkið venda sær til Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum. Annar heilivágur verður útskrivaður umvegis kommunulæknan.

Starvsfólkini geva búfólkunum heilivág. Leiðarin hevur álagt starvsfólkunum at verða hjá búfólkunum, til heilivágurin er tikin, og at syrgja fyri, at búfólkini taka heilivágin. Einki búfólk verður tvingað til at taka heilivág.

Tað verður sjáldan endurskoðað, hvørt búfólkini fáa rættan heilivág. Leiðarin nevndi eitt dømi um, at eitt búfólk hevði tikið skeivan heilivág í eitt longri tíðarskeið, áðrenn starvsfólkini løgdu til merkis, at honum ikki longur tørvaði hendan heilivágin.

Eitt starvsfólk hevur heilivágsgoymsluna um hendi. Starvsfólkið fylgir við, at nokk av heilivági er í goymsluni, og hevur heimild til at bíleggja nýggjan heilivág. Øll starvsfólk kunnu tó bíleggja heilivág, tá uppi er, og øll hava atgongd til heilivágsgoymslurnar og kunnu geva heilivág. Einki eftirlit er við heilivágsgoymsluni.

Stjórin á Nærverki greiddi umboðsmanninum frá, at tað ikki í longdini er møguligt at taka burturav heilivágnum hjá búfólkunum. Tað hevði verið lagt til merkis við sjúkueyðkennunum, um búfólkið ikki fekk sín rætta heilivág.

Stjórin á Nærverki greiddi eisini frá, at Nærverk í løtuni arbeiðir saman við landslæknanum um at skipa eitt heilsufakligt eftirlit við stovnunum undir Nærverki. Landslæknin hevur skotið upp, at hann hevur eftirlit við bústovnunum í 3 ár. Í hesum tíðarskeiði kundi hann upplært ein sjúkrarøktarfrøðing til at havt eftirlitið. Síðani kundi hesin sjúkrarøktarfrøðingur hildið áfram at havt eftirlit við stovnum og sambýlum undir Nærverki.

*Eftir mínari meting, er tað ikki nøktandi, at øll starvsfólkini hava atgongd til heilivágsgoymsluna, og at øll kunnu bíleggja heilivág. Hetta serliga sæð í mun til tann heilivág, ið ikki verður útskrivaður í dosispakkum. Heilivágsskipanin eigur at verða undir eftirliti, annars kann skipanin føra til misnýtslu.*

*Tað eigur at verða endurskoðað við jøvnum millumbilum, hvørt búfólk fáa rættan heilivág.*

***Eg fari tí at heita á leiðsluna, saman við Nærverki****, um at skipa eitt innaneftirlit við heilivágsgoymsluni. Hetta kundi verið gjørt á sama hátt, sum í sjúkrahúsverkinum.*

Leiðarin hevur í hoyringssvari, dagfest 30. mai 2007, boðað frá, at onkur búfólk (teir við dómi) fáa kannað, um heilivágurin er rætt doserðaur. Hetta verður gjørt við blóðroynd hálva hvørt ár. Tá nýggjur heilivágur verður givin, verða blóðroyndir tiknar fyri at kanna, hvussu doseringin hóskar. Okkurt búfólk hevur onga fasta skipan viðvíkjandi kanning av heilivági. Leiðslan fer at heita á Psykiatriska depilin um at fáa eina fasta skipan í lag fyri øll búfólkini.

Viðvíkjandi innaneftirliti, fer leiðslan at seta seg í samband við Nærverkið um mannagongdir hesum viðvíkjandi. Kanska kann sambýlið nýta sama leist sum heilsurøktarfrøðingarnir á Landssjúkrahúsinum, har eitt starvsfólk kannar heilivágsgoymslurnar um dagin, og náttarvaktin ger tað sama hvørt kvøld. Telja upp og gera viðmerkingar.

Nærverk hevur í hoyringssvari, dagfest 6. juni 2007, boðað frá, at Nærverkið samanumtikið tekur undir við tí mannagongd, sum leiðarin á sambýlinum hevur skotið upp m.a. við eini eftirlitsuppteljing hjá náttarvaktini.

Viðvíkjandi skipan av innaneftirliti annars, hevur Nærverk gjørt avtalu við landslæknan um at fremja heilsufakligt eftirlit av øllum stovnum í Nærverkinum, herundir eisini Trivnaðartænastuni. Hesi eftirlit verða á heysti 2007. Nærverkið væntar tá at fáa eina niðurstøðu og tilráðing frá landslæknanum, eisini viðvíkjandi umsiting av heilivági og heilivágsgoymslunum á stovnum og sambýlum. Við hesum ætlar Nærverkið at leggja áherðslu á, at stovnarnir fylgja mannagongdum.

*Eg fari at biðja Nærverk lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

*Tað er ikki nøktandi, at einki heilsufakligt eftirlit er við sambýlinum.* ***Eg fari at heita á Nærverk*** *at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

## *5.2. Rúsevni*

Leiðslan í sambýlinum greiddi umboðsmanninum frá, at stovnurin ongar trupulleikar hevur av rúsevnum. Fyrr hevði onkur av búfólkunum rúsevnistrupulleikar, men í løtuni er ongin trupulleiki hesum viðvíkjandi. Tað at búfólkini taka so nógvan heilivág ger, at trý av teimum ikki kunnu drekka rúsdrekka.

Eingin rúsevnispolitikkur er fyri búfólkini, men starvsfólkini fylgja ”Rúsevnapolitikkinum á Serforsorgarøkinum”, sum Nærverk hevur tilevnað. Umboðsmaðurin fekk avrit av hesum politikki.

### *5.3. Royking*

Leiðarin í sambýlinum hevur greitt umboðsmanninum frá, at búfólkini hava loyvi til at roykja inni í sínum íbúðum, men ikki á felagsøkjum. Starvsfólk kunnu roykja saman við búfólkum í íbúðum teirra. Starvsfólk roykja av og á í fýrrúminum. Eitt búfólk roykir ikki, meðan hini búfólkini roykja nógv. Sera nógv verður roykt í sambýlinum, og starvsfólkini hava trupulleikar av at vera inni í roykinum. Hetta gongur út yvir trivnaðin. Tað er ikki góð útlufting, m.a. tí at fleiri vindeygu ikki fáast upp. Eingin ventilatión er í húsinum. Tó hevur eitt búfólk fingið el-viftu setta upp í køkinum. Eingin roykipolitikkur er á stovninum.

*Av tí at íbúðirnar í sambýlinum eru heim hjá búfólkunum, eiga búfólkini sjálvi at ráða yvir, hvat tey gera har.*

***Eg fari tó at heita á Nærverk*** *um at seta ein roykipolitikk í verk fyri felagsøkir í sambýlum, sum skal verða galdandi bæði fyri búfólk og starvsfólk á stovnum undir Nærverki. Hetta fyri at verja búfólk og starvsfólk ímóti royki.*

Leiðslan í sambýlinum hevur í hoyringsskrivi sínum upplýst, at søkt er um eykajáttan til ventilatión.

Nærverk hevur í hoyringsskrivi sínum, dagfest 6. juni 2007, boðað frá, at umsókn um betri útsúgving á Bóndaheygi er sett á fíggjarlógaruppskotið fyri 2008. Nærverkið fer at arbeiða við at evna ein roykipolitik fyri alt økið. Nýggj tubbakslóggáva er í umbúnað, og fer Nærverkið at evna ein roykipolitik samsvarandi nýggju lógini.

## 6. Persónligar upplýsingar og samskifti

### *6.1. Varðveitsla av persónligum upplýsingum*

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at eingin journalskipan er, hvørki manuel ella elektronisk. Persónligu skjølini hjá búfólkunum verða goymd í arkivskápinum í teldurúminum, í brandskápi og í ringbindum á skrivstovuni. Roknskapur verður goymdur í ringbindum í teldurúminum, annars er ikki skipað, hvørji skjøl verða goymd hvar. Arkivskápið í teldurúminum er stongt. Bert leiðslan á stovninum hevur atgongd til skápið. Ringt er at finna fram til skjøl, av tí at tey ikki eru skipað, skrásett ella talmerkt og av tí, at tey liggja ymsastaðni í húsinum. Stjórin á Nærverki greiddi umboðsmanninum frá, at Nærverk arbeiðir við Doculive journalskipanini á Meginskrivstovuni og ætlar at fáa hesa skipan út

til stovnarnar eisini, men hetta er eitt trupult arbeiðið, ið tekur tíð og krevur starvsfólkaorku.

Á skrivstovuni er ein telda, ið leiðslan hevur atgongd til. Á hesi teldu verða upplýsingar um alt virksemi goymdar. Harumframt er ein telda í teldurúminum. Hesa teldu hava bæði starvsfólk og búfólk atgongd til. Starvsfólk nýta telduna til arbeiðsbrúk m.a. til roknskap fyri búfólkini, ímeðan búfólkini t.d. nýta telduna til internet og onnur persónlig viðurskifti. Búfólkini nýta telduna lítið. Tá ið búfólk ella starvsfólk eru loggað á telduna, er møguligt at síggja øll skjøl á henni. Hurðin til teldurúmið er stongd, tá ið eingin nýtir hølið.

Leiðarin greiddi frá, at hvørt einstakt búfólk hevur eina dagbók, ið starvsfólkini skriva í hvønn dag um, hvussu dagurin hevur gingið hjá búfólkunum. Í hesa dagbók verða eisini nakrir tilburðir viðvíkjandi harðskapi skrásettir. Dagbøkurnar liggja á eini hyll í starvsfólkarúminum, sum øll hava atgongd til. Harumframt liggur eisini ein bók, ið starvsfólkini skriva ymisk boð upp í. Umboðsmaðurin hevur hugt ígjøgnum dagbøkurnar og starvsfólkabókina.

*Tað er ikki nøktandi, at eingin journalskipan er á stovninum. Sambært § 1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um Føroya Landsskjalasavn, er ásett, at savnindi hjá almennum stovnum skulu goymast og varðveitast. Sambært § 7 í hesi lóg hevur stovnurin ábyrgdina fyri, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt.*

*Sambært góðum fyrisitingarsiði eiga øll skjøl á stovninum at verða skrásett og talmerkt, og fysisku málini eiga at verða varðveitt á einum tryggum stað. Hetta serliga sæð í mun til, at viðkvæmar, privatar upplýsingar um búfólkini verða varðveittar á stovninum. Onnur óviðkomandi eiga ikki at fáa innlit í upplýsingarnar. Heldur ikki onnur búfólk á stovninum. Neyðugt er ikki við einari elektroniskari journalskipan, ein manuel skipan hevði nøktað tørvin.*

***Eg fari tí at heita á leiðsluna*** *um, sum skjótast, at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

Leiðarin hevur í hoyringsskrivi, dagfest 30. mai 2007, boðað umboðsmanninum frá, at leiðslan hevur kannað ymiskar møguleikar viðvíkjandi journalskipan. Leiðslan hevur, tann 30. mai 2007, sent teldupost til Landsskjalasavnið um at fáa hjálp til at byggja eina journalskipan upp á Bóndaheygi 14. Leiðslan hugsar, at gamla journalskipanin sum Serstovnadeildin brúkti kanska kundi verið brúkilig hjá sambýlinum. Hetta kundi verið bíligasta loysnin. Leiðslan fer at heita á Meginskrivstovuna um hetta.

*Eg fari at biðja leiðsluna lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

*Viðvíkjandi tí, at bæði starvsfólk og búfólk nýta telduna, ið stendur í teldurúminum, stinga spurningar seg upp um atgongd til upplýsingar hjá sær sjálvum og atgongd til upplýsingar hjá øðrum.*

*Eitt búfólk hevur rætt til at síggja privatar og fíggjarligar upplýsingar um seg sjálvan, undantikið í teimum førum, har umhugsnið fyri búfólkinum sjálvum avgjørt talar ímóti hesum, jb. § 4, stk. 2, síðsta punktum í innlitslógini.*

*Viðvíkjandi atgongd til upplýsingar hjá øðrum búfólkum, er m.a. ásett í § 12, stk. 1, at rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum.*

*Búfólkini hava sostatt ikki rætt til at síggja privatar upplýsingar viðvíkjandi øðrum búfólkum enn sær sjálvum.*

*Starvsfólkini hava í sínum starvi rætt til at síggja allar upplýsingar um búfólkini, sum teimum tørvar, fyri at røkja sítt starv. Samstundis hava tey tagnarskyldu sambært § 26, stk. 1 í fyrisitingarlógini.*

*Við at varðveita upplýsingar um øll búfólkini á einari teldu, ið øll búfólkini hava atgongd til, er vandi fyri, at starvsfólkini ótilvitað koma at bróta sína tagnarskyldu, jb. § 26, stk. 1, nr. 6 í fyrisitingarlógini. Hetta er eisini galdandi, sjálvt um tað ikki er sannlíkt, at nakar av búfólkunum fer inn og hyggur at upplýsingunum.*

***Eg fari at mæla leiðsluni í sambýlinum** til at broyta mannagongd, soleiðis at búfólkini ikki hava møguleika fyri at síggja, hvørjar persónligar og fíggjarligar upplýsingar starvsfólkini føra inn á telduna um hini búfólkini.*

*Hetta kundi t.d. verið skipað soleiðis, at kodur vóru settar á telduna, soleiðis at hvørt búfólk sær hevði sína kodu, har tey bert kundu síggja sínar egnu upplýsingar.*

Leiðarin hevur í hoyringsskrivi, dagfest 30. mai 2007, boðað frá, at tað er í umbúnað at seta kodur á telduna, so hvørt búfólk sær hevur egnan brúkara á telduni.

*Eg fari at biðja leiðsluna lata meg frætta, hvat víðari hendir í hesum málinum.*

*Tað er heldur ikki nøktandi, at dagbøkur við viðkvomum upplýsingum um búfólkini liggja soleiðis fyri, at øll hava atgongd til at lesa í teimum. Hesar eiga at verða varðveittar í stongdum skápi.*

***Eg fari at heita á leiðsluna um*** *at bera so í bandi, at hetta verður gjørt.*

## 6.2. Samskifti

Leiðarin greiddi frá, at persónlig brøv og pakkar altíð verða latin búfólkinum, soleiðis at tey kunnu opna sjálvi. Tá ið talan er um rokningar v.m. letur leiðarin brævið upp, stemplar tað sum móttikið og leggur tað í persónligu skuffuna hjá búfólkinum.

Búfólkini hava atgongd til telefon uttan hjáveru av starvsfólki. Trý búfólk hava fartelefon, eitt búfólk hevur fastnettelefon, umframt eina fartelefon og eitt búfólk hevur eina telefon í íbúðini, ið samrøður verða stillaðar inn til frá høvuðstelefonini í húsinum. Telefonirnar verða ikki avlurtaðar av starvsfólki.

*Tað er í tráð við § 72 í grundlógini, at búfólkini sjálvi opna persónlig brøv og pakkar, og at búfólkini hava rætt til at nýta telefon, uttan hjáveru ella avlurting frá starvfólki.*

*Hóast talan er um rokningar, er hetta eisini at meta sum persónligur postur til hvørt einstakt búfólk, og tað er tí ikki rætt, at leiðarin í sambýlinum opnar hesar rokningar, uttan at hetta verður gjørt í samráð við búfólkini.*

***Eg fari tí at heita á leiðsuna*** *at bera so í bandi, at búfólkini, møguliga saman við kontaktfólki, opna allan post sjálvi.*

Leiðarin hevur í hoyringsskrivi, dagfest 30. mai 2007, upplýst, at mannagongdin viðvíkjandi posti er broytt, soleiðis at allur postur til búfólk verður stemplaður fyri móttøku á konvoluttin og lagdur í teirra persónligu skuffu. Har hava tey møguleika at lata postin upp saman við kontaktfólki.

*Eg havi tikið hesar viðmerkingar til eftirtektar.*

# 7. Fíggjarviðurskifti

## 7.1. Generelt

Á Løgtingsins Fíggjarlóg er ein rakstrarjáttan til Serforsorg. Lógargrundagarlagið undir Serforsorgini er § 32 í forsorgarlógini. Serforsorgin fevnir um dagstovnar, sambýlir, bústovnar, umlættingarstovnar, verk- og virknishús. Nakrir av hesum eru

landsstovnar, sum verða riknir beinleiðis undir Nærverki, ímeðan aðrir eru skipaðir sum sjálvsognarstovnar.

Av hesi játtan fær sambýlið á Bóndaheygi á hvørjum ári eina játtan frá landinum til dagliga raksturin av sambýlinum. Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at av tí at skorið verður javnan í játtanini, er tað nú trupult at fáa fíggjarætlanina at hanga saman. Starvsfólk manglar á stovninum, serliga tí neyðugt er at ”mansverja” tvey búfólk, ið hava dóm. Ein sjálvstøðugur roknskapur er viðvíkjandi játtanini frá landinum.

Sjálvsognarstovnurin hevur til endamáls at eiga og reka sambýlið á Bóndaheygi so bíliga sum til ber. Stovnurin hevur ikki heimild til at fara undir nýbygging, men stendur fyri umbyggingum og umvælingum í sambýlinum, jb. §§ 1 og 3 í viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin. Ein sjálvstøðugur roknskapur er viðvíkjandi rakstrinum av sjálvsognarstovninum, sum nevndin fyri sjálvsognarstovnin umsitur.

Av tí at talan er um eitt sambýli, har goldið verður húsaleiga, fáa búfólkini pensjón útgoldnað. Kontaktpersónarnir hjá hvørjum búfólki umsita pensjónina hjá viðkomandi, sí niðanfyri. Fíggjarviðurskiftini hjá hvørjum einstakum búfólki verða gjørd upp á roknskapi fyri seg, ið verður grannskoðaður.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin eisini vitjað summarhúsøkið á Ternuryggi, sum er eitt arbeiðstilboð til búfólkini. Leiðslan segði, at tað er ringt hjá starvsfólkunum at fáa verkætlanina við summarhúsinum at mala runt fíggjarliga. Peningur krevst til løn til búfólkini, ta eyka starvsfólkaorku, sum skal til, tá ið búfólkini arbeiða á summarhúsøkinum, og til tilfar, ið nýtast skal til arbeiðið. Tað hevur higartil gingið at úvega pening til arbeiðið, við at sambýlið hevur søkt um stuðul frá ymiskum privatum stuðlum og ymiskum grunnum. Eisini hevur sambýlið hildið bingo til frama fyri summarhúsøkið á Ternuryggi.

Leiðarin hevur í hoyringssvari, dagfest 30. mai 2007, boðað frá, at tey tingini, sum eru sett í verk í samband við vitjanina hjá umboðsmanninum, hava kostað stovninum meirtímar, og tað kemur framvegis at kosta meirtímar, um allar áheitanirnar frá umboðsmanninum skulu gangast á møti.

Landsstýrismaðurin hevur í hoyringsskrivi sínum, dagfest 31. mai 2007, boðað umboðsmanninum frá, at hann í sambandi við viðmerking frá leiðaranum um vantandi játtan til sambýlið á Bóndaheygi 14, fer at umrøða hendan spurning við Nærverkið.

## 7.2. Umsiting av pengum og ognum hjá búfólki

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at øll búfólkini fáa fyritíðarpensjón. Hvørt búfólk hevur tveir kontaktpersónar, og hava hesir báðir kontaktpersónar fingið fulltrú frá Almannastovuni til at umsita pensjónina hjá búfólkinum. Harumframt hevur leiðarin heimild til umsiting av pensjónum. Ein roknskapur verður gjørdur fyri hvørt búfólk. Roknskapurin verður grannskoðaður av uttanhýsis grannskoðara.

Búfólkini rinda 2.000,- kr. í húsaleigu og 3.050,- kr. til SEV, olju, mat, internetsamband v.m. Hesin peningur verður koyrdur í ein felagskassa, sum leiðslan hevur heimild til at umsita. Felagskassin verður grannskoðaður í roknskapi fyri seg. Um búfólkini hava serlig ynski, t.d. at keypa møblar ella annað til íbúðina, vegleiðir kontaktpersónurin búfólkinum í keypinum, síðani verður keypt fyri pening hjá búfólkinum.

Leiðslan greiddi frá, at av tí, at búfólkini ikki duga at stýra pengunum sjálvi, fáa tey ímillum 200 og 500 kr. í lummapeningi um vikuna. Hesin peningur verður lagdur í pengakassar í vaktarrúminum. Kontaktpersónarnir hjá hvørjum einstøkum búfólki hava ábyrgd av pengakassanum. Tá ið búfólkini ynskja at keypa eitthvørt, verður peningur givin teimum úr pengakassanum til endamálið.

Restin av peninginum hjá búfólkunum verður verandi á teirra egnu kontu í peningastovni.

Búfólkini hava fyri stuttum keypt ein buss til felags nýtslu. Til persónlig tiltøk rinda búfólkini uml. 20 kr. pr. túr í felagskassan. Ein sjálvstøðugur roknskapur verður førdur fyri bussin. Leiðslan á stovninum hevur ábyrgd av fíggjarviðurskiftunum viðvíkjandi bussinum.

Leiðslan segði, at hetta er sera gott fyri búfólkið. Fyrr nýttu starvsfólkini sínar egnu privatu bilar at koyra búfólkini runt við. Pláss var bert fyri fáum búfólkinum, og ringt var at fáa koyristólsbrúkaran við. Harumframt var tað trupult hjá búfólkunum at nýta almennu bussarnar.

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at tá ið búfólkini fara á feriu við starvsfólkunum, sum ikki verður mett at verða eitt námsfrøðiligt tiltak, rinda tey fyri sína egnu ferð og uppihald, og fyri ferðina hjá starvsfólki. Stovnurin rindar løn til starvsfólkið, ímeðan tey eru á feriu, tvs. dagløn og møguligar viðbøtur. Teir, ið sita við dómi, rinda tó ikki fyri starvsfólk, av tí at teir eru dømdir til at verða ”mansvardir” alt samdøgrið. Búfólkini seta fram ynski um, hvar tey skulu fara at ferðast.

Leiðarin greiddi víðari frá, at fara búfólkini til fótbóltsdyst, konsert, út at eta ella annað, verður meting gjørd av, hvørt hetta er eitt námsfrøðiligt tiltak. Er ikki talan um eitt námsfrøðiligt tiltak, rinda búfólkini fyri seg sjálvan og starvsfólk. Er talan um eitt námsfrøðiligt tiltak, rinda búfólkini bert fyri seg sjálvan, ímeðan stovnurin rindar fyri starvsfólkini. Á Bóndaheygi 14 hevur stovnurin í flestu førum goldið fyri starvsfólk, tí búfólkini eru so illa fyri, at tey á ongan hátt kunnu fara til tiltøk sjálvi. Antin eru tey illa fyri sálarliga, likamliga ella vegna dóm.

Teir dømdu rinda bert fyri seg sjálvan, tá ið teir fara at ferðast og til onnur persónlig tiltøk. Stovnurin rindar fyri starvsfólk. Hetta er ein avleiðing av dóminum, hóast ein upphædd ikki er oyramerkt til slík tiltøk á rakstrarjáttanini hjá stovninum.

Leiðarin greiddi frá, at hetta verður umsitið soleiðis sambært § 2 í reglugerð fyri sambýli. Leiðarin helt, at tað var trupult at meta um, hvørt eitt tiltak er námsfrøðiligt ella ikki, og tí verður hetta umsitið ymiskt á teimum ymisku sambýlunum í Føroyum.

Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av reglugerðini. Umboðið fyri Almanna- og heilsumálaráðið upplýsti, at Almanna- og heilsumálaráðið arbeiðir við nýggjum reglum hesum viðvíkjandi.

*Umboðsmaðurin hevur fingið innlit í øll skjølini hjá stovninum viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum hjá búfólkunum. Øll búfólkini fáa fyritíðarpensjón sambært løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir (pensjónslógini). Sambært § 35, 2. punktum í pensjónslógini kann Almannastovan heimila, at annar myndugleiki ella avvarðandi vegna Almannastovuna umsitur pensjónina fyri viðkomandi. Við hesi heimild hevur Almannastovan givið tveimum starvsfólkum í sambýlinum, ið eru kontaktfólk hjá búfólkinum, heimild til at umsita pensjónina hjá hvørjum einstøkum búfólki. Roknskapurin verður grannskoðaður av uttanhýsis grannskoðara.*

*Ein sjálvstøðugur roknskapur verður førdur fyri felagskassan og ein sjálvstøðugur roknskapur fyri bussin. Leiðslan hevur ábyrgd av hesum fíggjarviðurskiftum, og roknskapurin verður grannskoðaður av uttanhýsis grannskoðara.*

*Eftir mínari meting gevur hendan skipan eitt nøktandi fíggjarligt eftirlit, og eg havi tí ikki viðmerkingar hesum viðvíkjandi.*

*Sambært § 32, stk. 2, síðsta punktum í forsorgarlógini, skal landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um rakstur av sambýlum, herundir reglur um upptøku og gjalding. Hesar reglur eru ásettar í kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum. § 4, stk. 1 í hesi kunngerð eru soljóðandi:*

*"**§ 4.** Búfólk rinda húsaleigu fyri uppihaldið. Harumframt rinda búfólk til felags útreiðslur. Gjaldið hjá einum búfólki kann tó ikki fara upp um ta upphædd, sum svarar til veruligu útreiðsluna fyri hvørt plássið í viðkomandi sambýli."*

*Øll búfólkini hava í oktober 1999 skrivað undir leigusáttmála millum Serstovnadeildina, sum útleigara, og búfólki, sum leigara. Umboðsmaðurin hevur fingið innlit í hesar leigusáttmálar. Sambært § 2 í leigusáttmálunum verður leigan ásett til 2.000,- kr. um mánaðin. Hetta samsvarar við tað upphædd, ið búfólkini rinda í dag.*

*Eftir upplýsingum frá leiðsluni, er 3.050,- kr. í gjaldi til felags útreiðslur eitt rímiligt gjald fyri tær felagsútreiðslur, ið eru í sambýlinum. Eg havi ikki viðmerkingar til hetta.*

*Viðvíkjandi ferðum, frítíðarítrivum v.m. hevur leiðarin í sambýlinum upplýst, at hetta verður umsitið sambært reglugerð um sambýli. Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av reglugerðini. Reglugerðin er eitt umfarsskriv frá Almannastovuni, dagfest 4. august 1997 og hevur heimild í § 11, stk. 2 í "kunngerð nr. 11 frá 11. januar 1994 um reglur fyri skipan av sambýlum sambært forsorgarlógini". Hendan kunngerð er sett úr gildi, jb. § 11, stk. 2 í kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum. Sostatt er reglugerðin um sambýli eisini sett úr gildi.*

*Umboðið frá Almanna- og heilsumálaráðnum hevur á fundinum í sambandi við eftirlitsvitjanina upplýst fyri umboðsmanninum, at arbeitt verður við at tilevna nýggjar reglur hesum viðvíkjandi.*

***Eg fari at heita á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum** um at bera so í bandi, at hesar reglur verða settar í verk skjótast gjørligt.*

*Leiðslan hevur greitt umboðsmanninum frá, at tey tíðum ivast í, hvørt ein útreiðsla til ferðir ella frítíðarítriv skal gjaldast av stovninum, av tí at hetta er eitt námsfrøðiligt tiltak, ella hvørt útreiðslan skal gjaldast av búfólkinum, av tí at hetta er eitt persónligt tiltak. Tí verða hesar reglur ikki umsitnar á sama hátt í øllum sambýlum í Føroyum.*

***Eg fari at mæla landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum** til at taka støðu til hendan spurning í nýggju reglunum og útgreina, hvat verður meint við "pedagogiskan stuðul" í § 2, stk. 2 í gomlu reglugerðini um sambýli.*

Landsstýrismaðurin hevur í hoyringsskrivi sínum, dagfest 31. mai 2007, boðað umboðsmanninum frá, at arbeitt verður við at orða hesar reglur.

*Eg fari at biðja landsstýrismannin lata meg frætta, hvat víðari hendir í hesum málinum.*

## 8. Eftirlit

Nærverk hevur eftirlit við sambýlinum á Bóndaheygi 14, jb. § 9, stk. 1 í kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum, ímeðan landsstýrismaðurin hevur yvirskipaða eftirlitið við sambýlinum, jb. § 9, stk. 2 í somu kunngerð.

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at einki serligt eftirlit er við sambýlinum. Tað sæst ikki í skjølunum í málinum, at annað enn fíggjarligt eftirlit er við stovninum.

*Tað er ikki nøktandi, at einki serligt eftirlit er við sambýlinum. Eftir mínari meting eigur Nærverk at hava eitt neyvt eftirlit við sambýlinum sum heild, tað vil siga eftirlit við bæði námsfrøðiliga støðinum og innihaldinum í sambýlinum, eitt heilsufakligt eftirlit, eftirlit við fíggjarviðurskiftunum, eftirlit við teimum dømdu í sambýlinum, við fysisku umstøðunum á sambýlinum og umsitingini í sambýlinum annars. Víst verður til mínar viðmerkingar hesum viðvíkjandi omanfyri í frágreiðingini.*

***Eg fari at spyrja Nærverk,*** *hvørjar ætlanir eru um at betrað um eftirlitið við sambýlinum og lata meg frætta aftur.*

Nærverk hevur í hoyringsskrivi, dagfest 6. juni 2007, boðað frá, at umboð fyri Trivnaðartænastuna hava verið í Danmark, og kunnað seg um, hvussu eftirlit verður skipað við stovnum, sum líkjast teimum innan Trivnaðartænastuna. Ætlanin er at seta eina eftirlitsskipan í verk skjótast tilber. Ítøkiliga arbeiðið fer ætlandi í gongd í heyst, men er tó líka so nógv eitt mál, ið er aktuelt fyri Almanna- og heilsumálaráðið, við tað, at tað er sera lítið staðfest, hvat eftirlitið skal fevna um, t.v.s. hvat innihaldið á stovnunum skal umfata. Lóggáva má gerast hesum viðvíkjandi.

Landsstýrismaðurin hevur í hoyringsskrivi, dagfest 13. juni 2007, boðað frá, at hann er samdur við Nærverkinum í, at neyðugt er at gera broytingar í lóggávuni hesum viðvíkjandi, og er landsstýrismaðurin sinnaður at gera hesar broytingar.

*Eg fari at biðja landsstýrismannin og Nærverkið lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

# 9. Rundtúrur

## 9.1. Generelt

Generelt kann sigast, at húsini eru í rímiliga góðum standi. Ymsar ábøtur eiga tó at verða gjørdar. Hetta verður lýst niðanfyri.

Øll búfólkini búgva í hvør sínari íbúð. Hetta ger, at umhvørvið verður meira róligt, av tí at búfólkini kunnu hava eitt heimalív. Búfólkini eiga innbúgvið í teirra egnu íbúð, ímeðan stovnurin eigur innbúgvið á felagsøkjum.

Tá ið nýtt innbúgv skal keypast, verða búfólkini tikin við uppá ráð um, hvat tey ynskja sær. Hetta sæst aftur í íbúðunum, sum bera dám av, at hvørt einstakt búfólk hevur sett sín persónliga dám á íbúðina við innbúgvi, myndum v.m.

Ávaringarskipan er á øllum hurðum, bæði innan- og uttandura. Somuleiðis er ávaringarskipan á øllum vindeygunum. Hetta fari eg tí ikki at viðmerkja í hvørjum einstøkum føri í lýsingunum niðanfyri. Sí annars omanfyri um viðmerkingar til ávaringarskipanina.

*Tað er ein virðilig loysn fyri búfólkini, at tey hava hvør sína íbúð, og at tey sjálvi taka avgerð um, hvat innbúgv skal keypast til íbúðina.*

*Tað skal tó viðmerkjast, at atkomumøguleikarnir í sambýlinum ikki eru í lagi, sí mínar viðmerkingar niðanfyri viðvíkjandi atkomu. Tað sæst, at húsið ikki er bygt við tí endamáli at virka sum sambýli fyri brekað.*

## 9.2. Loftið

### Íbúð nr. 1

Íbúðin er á loftinum. Her er sera lágt til loftið, men íbúðin er stór og rúmlig. Arbeiðseftirlitið hevur funnist at hesum í frágreiðing, sum umboðsmaðurin hevur fingið til láns. Í stovuni eru sofur, sofaborð, skenkur, myndir á vegginum, sjónvarp og stereoútbúnaður. Trægólv. Í stovuni eru 3 vindeygu. Til ber at koma út á eina altan frá vindeygunum. Í loftinum er ein stórur krókur. Í køkinum er køksborð, vask, nýtt køliskáp, kaffimaskina, borð, stólar. Vindeyguni eru í lagi. Gott útsýnið yvir býin. Brandsløkkjari er í køkinum.

Í sovikamarinum eru tvær sengur, skáp, reol, skriviborð og stólur. Til ber at koma út á eina brandtrappu gjøgnum vindeyga í kamarinum. Vindeyga er ikki stórt og beint uttanfyri skal ein ansa eftir ikki at rena seg í takskeggið. Uttanfyri er ein lítil stálpallur. Brandtrappan er fest á hendan pallin og gongur steyrrætt niður í

túni. Brandtrappan er bygd sum eitt smalt rør, har bert ein persónur kann vera í senn, sí hjáløgdu myndir. Á loftinum býr ein maður, ið er illa fyri motoriskt.

Úr loftinum í køkinum og í sovikamarinum hanga leidningar, ið hoyra til ávaringarskipanina í húsinum. Leidningarnir eru ikki festir í sjálva ávaringarskipanina, og skipanin virkar sostatt ikki í vindeyganum í køkinum og í sovikamarinum á loftinum.

Trappan niður til miðhæddina er skirvislig og illa fest í veggin. Næstniðasta trinið er brotið. Har hava starvsfólkini sett eina træstyttu undir.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um beinanvegin at skipa fyri, at ávaringarskipanin verður umvæld í hesi íbúð. Hetta er alneyðugt sæð í mun til, at ein persónur við dómi býr í íbúðini, og at tað í sovikamarinum er ein brandtrappa, ið førir niður í tún beint uttanfyri.*

*Eisini fari eg at heita á leiðsluna um at taka krókin, ið er settur fastur í loftið, niður, av tí at møguleiki er fyri at gera skaða á seg sjálvan við krókinum.*

*Tað kann gerast sera trupult hjá starvsfólki í einari bráfeingisstøðu, at fáa ein menningartarnaðan mann, ið er motoriskt illa fyri, niður ígjøgnum tann lítla stigan í brandtrappuni. Umstøðurnar eru tí alt annað enn nøktandi.*

***Eg fari at mæla leiðsluni*** *til at finna eina betri loysn viðvíkjandi brandútgongd, og lata meg frætta, tá ið hetta er gjørt.*

*Harumframt fari eg at heita á leiðsluna um at skipa fyri, at trappan upp á loftið verður umvæld, soleiðis at hon verður trygg at ganga í. Serliga tá ið verður hugsað um eldsbruna, er tað umráðandi, at tað er møguligt at koma niður ígjøgnum trappurnar.*

Leiðslan hevur boðað mær frá, at krókurin er tikin niður undan loftinum í hesi íbúð, ávaringarskipanin er umvæld, trappan upp á loft er styrkt. Leiðarin fer at heita á sjálvsognarstovnin, um at fáa viðurskiftini viðvíkjandi brandútgongd uppá pláss.

## *9.3. Miðhæddin*

### Íbúð nr. 2

Í kamarinum er ein song, borð, stólar, skáp, myndir á vegginum. Í stovuni er sofa, stólur, sofaborð, skenkur. Ein gamal vatnskaði er í loftinum. Ein listi manglar við síðuna av ávaringarskipanini í

loftinum. Stovan og kamarið eru annars væl hildin. Í spísistovuni er eitt borð við nógvum stólum rundanum og ein skenkur. Í køkinum er eitt køksborð, vask, ein nýggjur komfýrur, mikroovnur og tvey køliskáp, eitt til búfólk og eitt til starvsfólk. Køksskáp og skuffur eru í sera ringum standi, skuffurnar í køksborðinum eru brotnar. Vindeyguni í hesi íbúðini eru í lagi.

Spísistovan í hesi íbúð verður onkuntíð nýtt til felags morgunmat fyri búfólkini. Ein endi av køkinum virkar sum starvsfólkarúm.

Hetta er ikki ein samanhangandi íbúð. Eitt rúm er til kamar og eitt annað rúm hinumegin gongina er til stovu. Spísistovan er við síðuna av kamarinum. Møguleiki er fyri, at búfólkið kann fáa eina samanhangandi stovu og spísistovu.

***Eg fari at heita á leiðsluna** um at skipa fyri, at neyðugar ábøtur verða gjørdar í hesari íbúð. Samstundis fari eg at spyrja um, hvørjar ætlanir eru viðvíkjandi samanhangandi stovu og spísistovu til búfólkið.*

Leiðslan hevur boðað mær frá, at ein listi er settur upp við síðuna av ávaringarskipanini í loftinum, at tað nú bert er eitt felags køliskáp, at skuffurnar í køksborðinum eru skiftar út, og at ein samanhangandi stova og spísistova er gjørd til hesa íbúð. Í staðin virkar gamli køkurin nú sum felagsrúm hjá starvsfólki.

Eitt skáp, sum er brotið, er ikki umvælt. Leiðslan ynskir skápini málaðið av nýggjum, og hevur keypt nýggj hondtøk. Arbeiðið er í ger.

### Íbúð nr. 3

Í stovuni er spísiborð við stólum, sofur, sofaborð, vitrina, skenkur, sjónvarp og myndir á vegginum. 3 vindeygu eru í stovuni. Tvey av teimum fáast ikki upp. Í køkinum er køksborð, borð, vask, kaffimaskina, komfýrur og nýtt køliskáp. Enn eru leivdir eftir, har gamla køliskápið stóð. Ein leki er í einum vindeyga í køkinum. Aftanfyri leysa borðið í køkinum er máling og spartling farin. Í kamarinum er ein song, telda, skriviborð, stólur og skáp. Tvey vindeygu eru í rúminum, eitt av teimum er í ólagi. Ein leidningur frá ávaringarskipanini, hongur undan loftinum í køkinum og í kamarinum.

***Eg fari at heita á leiðsluna** um at skipa fyri, at neyðugar ábøtur verða gjørdar í hesari íbúð.*

Leiðslan hevur boðað mær frá, at vindeyguni í íbúðini eru umvæld. Sambýlið bíðar eftir levering av listum, sum eru bílagdir. Ein leidningur, ið hekk frá ávaringarskipanini, er heftur. Alt er umvælt,

eins og borðplátan í køkinum er skift út, og okkurt yvirskáp er tikið niður. Tá timburarbeiðið er liðugt, verður ringt eftir málara.

## Baðirúm til íbúð 1, 2 og 3

Á miðhæddini er eitt felags baðirúm til íbúð 1, 2 og 3. Í baðirúminum er eitt wc, vask, spegl og brúsukabina. Baðirúmið er klætt við flisum. Ein listi rundanum durakarmin manglar. Tá ið vatnið rennur í langa tíð í baðnum, lekur niðurundir.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at skipa fyri, at bøtt verður um viðurskiftini í baðirúminum.*

Leiðslan hevur boðað mær frá, at ein listi rundanum durakarmin manglar at setast upp. Hann er í húsinum. Lekin var umvældur áðrenn vitjanina. Nú er eisini málað í niðaru hæddini eftir vatnskaðan.

## Vaktarrúm

Vaktarrúmið er á miðhæddini. Í vaktarrúminum er ein song, stólur, skáp til starvsfólk og ein reipstigið at sleppa út ígjøgnum vindeygað, um eldur er í. Nakrar myndir og ein talva við yvirliti yvir, hvar eldur kyknar, hongur á vegginum. Eisini er eitt yvirlit yvir, hvat vindeyga er latið upp í húsinum, tá ið ávaringarskipanin tendrar. Eingin burturflutningsætlan er fyri húsið, um eldur skuldi komið í.

Í vaktarrúminum er heilivágsgoymslan. Búfólkini hava eitt heilivágsskáp í part, sum er stongt. Skápini hanga á vegginum. Harumframt er eitt høvuðsskáp við lyklum, hondkeypsheilivági o.a., ið hongur beint undir liðini á hinum heilivágsskápunum. Lykilin til heilivágsskápini verður goymdur í høvuðsskápinum.

Umframt hetta verður lummapeningurin eisini varðveittur í vaktarrúminum. Lykil til pengakassarnar verður goymdur í høvuðsskápinum, ið er í vaktarrúminum.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at gera eina burturflytingarætlan fyri sambýlið.*

Leiðarin hevur boðað mær frá, at hon skal syrgja fyri hesum skjótast tilber.

## Starvsfólkabaðirúm

Yvirav vaktarrúminum er eitt lítið baðirúm til starvsfólkini. Í rúminum er wc, vask, hyllar og ein brúsukabina. Útluftning er í rúminum.

## Felagsrúm

Einki felagsrúm er í húsunum. Tó virkar køkurin hjá einum búfólki, sum eitt slag av felagsrúmi.

Búfólkini savnast tíðum inni í tí einu íbúðini á miðhæddini at hyggja í sjónvarp. Íbúðin er rættiliga rúmlig og rúmar lættliga øllum búfólkunum. Hetta rúmið verður eisini nýtt til felagstiltøk.

Eitt búfólk hevur ikki møguleika fyri at koma til hesi felagstiltøk, av tí at viðkomandi situr í koyristóli, og eingin lyfta er upp til miðhæddina.

*Hetta er óvirðiligt fyri búfólkið í koyristóli. Búfólkið er avbyrgt frá hinum búfólkunum, og kann ikki luttaka í felagstiltøkum, ið verða fyriskipað í miðhæddini.*

***Eg fari at biðja leiðsluna*** *um at kanna, hvørjir møguleikar eru fyri at bøta um hesi viðurskifti.*

Leiðarin hevur boðað mær frá, at køkurin í hesi íbúð, virkar ikki longur sum eitt slag av felagsrúmi fyri búfólkini, av tí at íbúð nr. 2 nú er broytt til eitt samanhangandi rúm. Ístaðin kunnu búfólkini nú samlast á skrivstovuni í neðra.

Tað er bert, tá ið búfólkini vitja hvønnannan, at tey hyggja í sjónvarp í tí einu íbúðini á miðhæddini, annars ikki. Bert í serligum førum verður hetta rúmið nýtt til felagstiltøk.

## Starvsfólkarúm

Út frá køkinum hjá tí eina búfólkinum er eitt lítið starvsfólkarúm við tveimum sofum, sofaborði, sjónvarpi og myndum á vegginum. Ein gardina verður nýtt til at skerma av fyri búfólki. Í hesum rúminum er ein leki, ið kemur frá takinum.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at skipa fyri, at lekin í takinum verður umvældur.*

Leiðarin hevur boða mær frá, at avtalað er, at tá ið turrari er í veðrinum, verður hetta kannað, og umvælt.

## Gongd í miðhædd

Gongin í miðhæddini er smøl. Brandútgerð hongur á vegginum. Á gólvinum er linoleumsparkett, ið summa staðni er forskotið ella liggur leyst. Leidningar frá ávaringarskipanini hanga niður úr loftinum.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at skipa fyri, at neyðugar ábøtur verða gjørdar í gongini.*

Leiðarin hevur boðað mær frá, at neyðugar ábøtur eru gjørdar í gongini.

## *9.4. Kjallarin*

### Íbúð nr. 4

Í íbúðini býr ein koyristólsbrúkari. Hann vísti okkum, hvussu ringt tað er at ferðast í íbúðini. Íbúðin er lítil og illa atkomulig. Sera trongt er at koma inn á wc og í bað. Eisini er trongt at koma við koyristóli úr kamarinum og inn í stovuna. Stovan er lítil og ring at røra seg í við koyristóli.

Í kamarinum eru tvær sengur og skáp. Kamarið er illa viðlíkahildið. Tað er langt síðani, at málað er, og ein leki er í loftinum. Úr loftinum hanga leidningar frá ávaringarskipanini og aðrir el-leidningar. Í køkinum er køksborð, komfýrur, nýtt køliskáp, tvey akvarium við skjaldbøkum og eitt spísiborð. Ein leki er í radiatorinum. Vindeyguni eru í lagi. Í stovuni er ein sofa, sofaborð, stólur, reolir, skáp og fleiri guitarar. Baðirúmið er lítið og klætt við flisum. Har er brúsukabina, vask og wc við útgerð til brekað.

Búfólkið hevur søkt um at flyta í aðra íbúð, har tað er meira atkomuligt.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at skipa fyri, at neyðugar ábøtur verða gjørdar í íbúðini.*

*Um búfólkið í íbúðini ikki flytur í aðra íbúð, er neyðugt at umbyggja íbúðina, soleiðis at hon verður meira atkomulig fyri koyristól.*

***Eg fari tí at biðja leiðsluna kanna,*** *hvørjir møguleikar eru at gera hesa íbúð meiri atkomuliga fyri koyristólsbrúkaran.*

Leiðarin hevur boðað mær frá, at nú er bert ein nýggj song á 140 cm. Køkurin er umvældur, og elvifta bíløgd í køkin. Kamarið er málað. Lekin í radiatorinum má gerast. Gjørt er vart við tað.

Búfólkið í hesi íbúð, hevur søkt um at flyta í aðra íbúð, ið er meira atkomulig, men hevur fingið noktandi svar. Leiðarin fer at seta seg í samband við sjálvsognarstovnin, viðvíkjandi hvørjir møguleikar eru fyri at gera hesa íbúð meiri atkomuliga fyri koyristólsbrúkaran.

### Íbúð nr. 5

Av tí at búfólkið ikki ynksti, at umboðsmaðurin skuldi síggja íbúðina, vóru vit ikki inni í hesi íbúð.

Hóast eg ikki var inni í hesi íbúð, hevur leiðarin boðað mær frá, at krókurin er tikin niður undan loftinum í hesi íbúð. Nýtt køliskáp er sett upp, køkurin verður skiftur út, og gongin er málað.

## Skrivstovan

Skrivstovan er í kjallaranum. Har er skriviborð, stólur, telda, talva, útvarp, fundarborð við stólum og bókreolir. Rúmið er væl hildið. Linoleumsgólv og væl málaðir veggir. Hurð og vindeygu eru í góðum standi. Á skrivstovuni stendur eitt brandskáp við upplýsingum um einstøku búfólkini.

Úr skrivstovuni gongur ein onnur hurð inn til íbúðina hjá einum búfólki. Ein papp pláta er sett fyri hurðina, soleiðis at hurðin ikki kann latast upp. Tað hoyrist sera væl ígjøgnum hurðina. Fundir verða javnan hildnir á skrivstovuni um búfólk, og telefonsamrøður eru eisini á skrivstovuni um viðurskifti hjá búfólkum.

*Tað er sera óheppið, at tað hoyrist so væl ímillum skrivstovuna og ta einu íbúðina.* ***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at skipa fyri, at bøtt verður um viðurskiftini viðvíkjandi hurðini á skrivstovuni.*

Leiðarin hevur boðað mær frá, at hurðin á skrivstovuni, ið førdi inn til íbúðina hjá einum búfólki, er burtur. Veggurin er ljóðisoleraður og málaður.

## Teldurúm

Í kjallaranum er eitt lítið teldurúm, sum verður nýtt av bæði starvsfólki og búfólki. Í rúminum er ein telda, kopimaskina, telefax, skriviborð, stólur, arkivskáp og bókreolir við ringbindum.

Leiðarin hevur boðað mær frá, at loftið í teldurúminum er málað.

## Gongd og trappur í kjallara

Gongin í kjallaranum er rúmlig og væl hildin. Har er garderoba og spegl. Møguleiki er fyri koyristóli at koma inn og út úr húsunum. Í gongini stendur ein avlamiskoyristólur við motori, sum eitt búfólk eigur.

Trappurnar uppá miðhæddina eru høgar vinkultrappur, vanlig breidd, ið ikki eru atkomuligar fyri koyristólsbrúkarar, sí hjáløgdu myndir.

*Atkomumøguleikarnir hjá koyristólsbrúkarum eru ikki nøktandi. Neyðugt er at seta eina lyftu ella líknandi upp, soleiðis at koyristólur kann koma frá kjallaranum uppá miðhæddina.*

***Eg fari at biðja leiðsluna kanna,*** *hvørjir møguleikar eru at bøta um atkomumøguleikarnar til miðhæddina hjá koyristólsbrúkarum.*

Leiðarin ynskir at kunna parkera avlamiskoyristólin í gongini í hjallinum. Um so er má asfalterast heilt runt um húsini. Leiðarin fer at seta seg í samband við sjálvsognarstovnin hesum viðvíkjandi.

Leiðarin fer eisini at seta seg í samband við sjálvsognarstovnin viðvíkjandi betri atkomumøguleikum til miðhæddina hjá koyristólsbrúkaranum.

### Fýrrúm

Í fýrrúminum vaska búfólkini klæðir. Her er vaskimaskina, turkitrumla, fýrur, skáp og vask. Leidningar hanga leysir undan loftinum. Vindeyga er í lagi. Tað sæst ikki, um ávaringarskipanin er knýtt at hesum rúmi. Ein listi yvir vaskidagar hjá búfólki hongur á hurðini. Gáttin er sera høg, og eingin skrái er á gáttini, soleiðis at koyristólur sleppur ikki inn í fýrrúmið.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at skipa fyri, at neyðugar ábøtur verða gjørdar í fýrrúminum, og ein skrái verður settur á gáttina, so at til ber at koma inn í fýrrúmið við koyristóli.*

Leiðarin hevur boðað mær frá, at leysu leidningarnir undan loftinum eru festir, og alarmur er settur á hurðina. Ein timburmaður hevur mett um, hvørt ein skrái kann setast upp, so at til ber at koma inn í fýrrúmið við koyristóli.

## *9.5. Húsið og økið uttandura*

Húsið er úr betong, so her er eingin klædningur at viðlíkahalda. Í takinum er ein leki, soleiðis at vatn lekur niður í uppihaldsrúmið hjá starvsfólkunum, tá ið regnar.

Eingin havi er til húsið, men tað er eitt lítið tún rundan um húsini, har skervur er lagdur á. Nakrir stórir hjallar standa aftanfyri húsini. Sambært starvsfólkunum verða hesir hjallar nýttir til frystiboks, órudd v.m.

Tað eru ikki góðar umstøður til at sita uttanfyri hjá búfólki, tá ið veðrið er gott, men tað er møguligt. Frammanfyri inngongdina til húsini er asfalterað, soleiðis at koyristólsbrúkarar kunnu sleppa inn og út úr húsunum. Koyristólsbrúkarar hava tó ikki møguleika fyri at koyra út í túnið aftanfyri húsini, av tí at skervur er lagdur á.

***Eg fari at heita á leiðsluna*** *um at skipa fyri, at lekin í loftinum verður umvældur. Harumframt fari eg at* ***biðja leiðsluna kanna,*** *hvørjir møguleikar eru fyri at bøta um viðurskiftini uttanfyri húsini.*

Leiðarin hevur boðað mær frá, at viðvíkjandi lekanum í loftinum, er avtalað, at tá turrari er í veðrinum, verður hetta kannað og

umvælt. Sambýlið ynskir asfalt allan vegin runt um húsini. Leiðarin fer at seta seg í samband við sjálvsognarstovnin hesum viðvíkjandi.

*Eg havi tikið viðmerkingarnar viðvíkjandi hesum kapitli til eftirtektar, og fari at biðja leiðaran lata meg frætta aftur viðvíkjandi teimum viðurskiftum, sum ikki enn eru avgreidd.*

## 10. Summarhúsøkið á Ternuryggi

Umboðsmaðurin hevur vitjað summarhúsøkið á Ternuryggi. Leiðarin greiddi frá, at summarhúsøkið var leigað frá Tórshavnar kommunu til hetta endamálið í 1990. Greitt varð frá, at sambýlið rindar 200,- kr. um árið í leigu fyri økið til Tórshavnar kommunu.

Summarhúsøkið er stórt, eini 2.000 fermetrar til støddar og liggur væl fyri í friðarligum umhvørvi við góðum útsýni yvir Havnina.

Ein flisaklødd gøta gongur inn til húsini, sum liggja mitt á økinum. Inni í summarhúsinum er eitt borð, stólar og brenniovnur. Streymur er til húsini, men einki vatn ella kloakk. Leiðarin greiddi frá, at sambýlið hevur sett seg í samband við Tórshavnar Kommunu fyri at spyrja, um vatn og kloakk kann leggjast til summarhúsið, soleiðis at tey kunnu fáa vatn og vesi í húsinum, men hevur ikki fingið svar.

Umboðsmaðurin hevur spurt Tórshavnar kommunu um hesi viðurskifti og kommunan hevur við telduposti, tann 10. apríl 2007, svarað, at talan er um eitt kolonihavaøki, og tískil hevur kommunan ikki raðfest arbeiðið at leggja veitingar so sum vatn, kloakk ella el til nevnda økið serliga høgt. Hetta hevur kommunan munnliga boðað fyrrverandi leiðaranum frá, eftir munnligan fyrispurning frá sambýlinum. Annars varð upplýst, at kommunan tey næstu árini hevur ætlanir um at leggja kloakkleiðingar á øllum økinum við Hoydalsá.

Leiðslan greiddi frá, at tá ið búfólkini fóru undir at arbeiða á summarhúsøkinum, var lítið skil á økinum. Búfólkini hava saman við starvsfólkunum grivið alt økið upp av nýggjum, tey hava drenað økið, grivið eina stóra veit ígjøgnum stykkið, og lagað veitina upp við gróti. Tvær prýðiligar brúgvar eru bygdar yvirum veitina. Harumframt hava búfólkini saman við starvsfólkum lagað eina grill úr gróti, lagað trappur úr gróti til summarhúsið og lagt flisar á, soleiðis at gangast kann runt á økinum. Eisini hava búfólkini bygt tvey hvíldarstøð og ein leikpall.

# 11. Samrøður við búfólk

Í sambandi við eftirlitsvitjanina varð eitt uppslag sett upp í sambýlinum, har kunnað varð um eftirlitsvitjanina. Tey búfólkini, sum høvdu hug til tess, fingu tilboð um at fáa eina samrøðu við umboðsmannin um viðurskiftini á stovninum ella um teirra privatu viðurskifti. Í hesum sambandi varð gjørt vart við, at umboðsmaðurin ikki kundi taka støða til spurningar, sum hoyra heima hjá Løgregluni ella í Føroya Rætti.

Trý búfólk ynsktu at fáa orðið á umboðsmannin. Á hesum fundum settu búfólkini fram nøkur ynski um broytingar viðvíkjandi viðurskiftum teirra. Burtursæð frá hesum greiddu búfólkini umboðsmanninum frá, at tey vóru væl nøgd við at búgva í sambýlinum.

Umboðsmaðurin legði ynskini hjá búfólkunum fram fyri leiðsluna í Nærverk og leiðaranum av sambýlinum á tí endaliga fundinum, sama dagin.

# 12. Kunning og uppfylging

Hendan frágreiðing varð send Sambýlinum á Bóndaheygi 14, Nærverki, Almanna- og heilsumálaráðnum og Innlendismálaráðnum til viðmerkingar.

Sum tað framgongur av ymsu brotunum frammanfyri, bað eg omanfyristandandi myndugleikar um viðmerkingar viðvíkjandi ymiskum viðurskiftum.

Eg bað eisini um, at avrit av viðmerkingum og svarum frá sambýlinum vórðu send til Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðið. Hetta soleiðis, at teir myndugleikar, ið hava ábyrgd av og eftirlit við sambýlinum, skuldu fáa høvi til at gera viðmerkingar til tað, sum varð ført fram. Somuleiðis bað eg um, at avrit av viðmerkingum og svarum frá Nærverki vórðu send Almanna- og heilsumálaráðnum.

Tá ið Almanna- og heilsumálaráðið, Nærverk, Sambýlið og Innlendismálaráðið høvdu svarað mær uppá settu spurningarnar, vórðu viðmerkingarnar førdar inn í frágreiðinginina, í tann mun eg metti, at viðmerkingarnar høvdu týdning fyri málið.

Frágreiðingin varð síðani send Sambýlinum, Nærverki, Almanna- og heilsumálaráðnum og Innlendismálaráðnum. Harumframt varð frágreiðingin send búfólkunum í sambýlinum og Løgtinginum til kunningar, og seinni løgd út á heimasíðuna hjá umboðsmanninum.

Í teimum førum, har eg havi biðið myndugleikarnar lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum, fari eg, tá ið ein tíð er fráliðin at kanna, hvat er hent í málinum.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður

# Viðlagt skjal

Ávísar myndir frá eftirlitsvitjanini